| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. februar 2016 | Blað nr.: 1 |
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 25. februar 2016 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Olsen
Sigrun Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir
Mikael Viderø
Jóan Petur Hentze

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

## 34/16 Mál beind í nevndir 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 5/16 | 16/00042-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 34/16 | 16/00042-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Tikið til eftirtektar.

## 35/16 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 13. november 2012 (2012-0824)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 04.03.2014 | 41/14 | 14/01380-7 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 35/16 | 14/01380-7 |

**Málslýsing:**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 13. november 2012.**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

- Bjørgfríð Ludvig hevur sagt seg úr valstýrinum.

**Býráðsfundur 4. mars 2014:**
Vald varð Ingibjørg Berg.
**Ískoyti:**
Ingibjørg Berg hevur sagt seg úr valstýrinum, tí hon gevst í starvinum sum kommunustjóri.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Vald varð Ingunn Eiriksdóttir.

## 36/16 Val av valnevnd til býráðsvalið 2016 (2012-2849)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 36/16 | 16/00989-3 |

**Málslýsing: 2012-2849/1 SG**

**Val av valnevnd til býráðsvalið 2016**
Sbrt. § 3, stk. 1, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, verður býráðsval fyriskipað og fyrireikað undir leiðslu av eini valnevnd, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. november 2012:** Vald vórðu Niels Nattestad, Ingibjørg Berg, Jóan Petur Hentze og Eli Christiansen.

**Ískoyti:**
Ingibjørg Berg hevur sagt seg úr valnevndini, tí hon gevst í starvinum sum kommunustjóri.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Vald varð Bjørgfríð Ludvig.

## 37/16 Undirskriftsreglur í sambandi við skjøl, ið binda kommununa

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 51/16 | 16/00963-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 37/16 | 16/00963-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 44, 2, í lóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýrið - kommunustýrislógin - skulu skjøl í sambandi við keyp og sølu av fastari ogn o.t. verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess.

Harumframt er ásett í § 6, 1. petti í Kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu, at øll skjøl, ið binda kommununa, skulu undirskrivast av borgarstjóranum og einum persóni, sum býráðið hevur heimilað til tess.

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at Bjørgfríð Ludvig, kommunustjóri, verður tilnevnd at medundirskriva skjøl sambært kommunustýrislógini § 44, 2, og kommunustýrisskipanini § 6, 1. petti, frá 01. mars 2016 at rokna.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

# 38/16 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | |
|---|---|
| Matr.nr. 1099 | 14.660 m² |
| Matr.nr. 1100 | 15.280 m² |
| Matr.nr. 1102c | 5.879 m² |
| Tilsamans | 35.819 m² |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 39/16 Útbygging av høllini í skúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 203/15 | 15/03776-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 216/15 | 15/03776-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 276/15 | 15/03776-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 25.11.2015 | 238/15 | 15/03776-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 302/15 | 15/03776-1 |
| 6 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 238/15 | 15/03776-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.12.2015 | 333/15 | 15/03776-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.12.2015 | 255/15 | 15/03776-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 8/16 | 15/03776-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 13/16 | 15/03776-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 50/16 | 15/03776-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 53/16 | 15/03776-1 |
| 13 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 39/16 | 15/03776-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 25.02.2016 | 83/16 | 15/03776-1 |

**Málslýsing:**
***Søga***
Skúlin á Argjahamri www.argjaskuli.fo varð liðugt bygdur á sumri 2011 og varð tikin í brúk í august 2011. Fimleikarhøllin í skúlanum er 22 m. x 22 m. og hevur umleið 196 m2 í goymslurúmum. P/F MAP Arkitektar var ráðgevarafelag og P/F Articon bygdi skúlan í partalagsavtalu.

Ítróttavirksemið er umfatandi í Tórshavnar kommunu og hevur verið í støðugum vøkstri farnu árini. Torført er at nøkta eftirspurningin og tørvin hjá ítróttafeløgum. Nýtslustigið av høllini er at kalla fult hvønn dag eftir skúlatíð og í vikuskiftunum.

***Uppskot til loysn***
Upprunaliga var ætlan, at fimleikahallirnar skuldu hava støðd sum ítróttarhøll. Hetta ber framvegis til at fremja við eini uppíbygging á tilsamans 685 m2., so møguleiki verður fyri hondbóltskappingarvølli á 20 m x 40 m, umframt frástøðugeira til vegg, 2,8 metrar frástøðu til vegg vestureftir (verandi bygningslutir í vestaru framsíðu, kunna í stóran mun endurnýtast). og 2,7 metur frástøðu eystureftir. 1,5 m. frástøða suðureftir og 1,2 frástøða móti sitiplássum norðureftir.

Við at skera í verandi vegg norður eftir, og flyta hann 1,9 metrar inn í verandi goymslur, ber til at fáa pláss fyri 3 røðum av sitiplássum. Við 0,5 m til hvørt sitipláss, verða 210 sitipláss í uppskotinum.

Pláss er gjørt til at útvega tvey skiftingarrúm aftrat, og tvær goymslur eru varðveittar til verandi goymslu.

Roknað verður við, at verandi el- og HVS-skipanir kunnu trekkjast víðari fram, og stórvegis eykaútreiðslur verða ikki til samlaðu dimensioneringina av hesum anleggum.

***Kostnaðarmeting***
Fyribils verður mett at talan kann verða um eina bygging fyri umleið 15 mio.kr., umframt

ráðgeving, ókent v.m. á umleið 1 mio.kr. Onkrar óvissur eru, sum mugu kannast nærri í fyrireikingunum. Mett byggitíð, íroknað projektering er 16 mánaðir, og mett verður, at projektering kann byrja í januar 2016.

***Nyttuvirði***

Við útbyggingini fæst ein hondbóltsvøllur afturat, sum kann brúkast til hondbólt, flogbólt o.a. og ÍA, sum er felag á Argjum, kann í høvuðsheitum fara úr Høllini á Hálsi og so verða sjey tímar tøkir har. Um t.d. Fleyr fer úr Gundadalshøllini verða 11 tímar tøkir har. Hesar tilsamans 18 tímarnar kundu Kyndil, H-71 og Neistin so fingið aftrat.

Møguligt býti millum tey feløg, sum fara at brúka høllina í Skúlanum á Argjahamri kundi verið, at ÍA fær (í mun til støddarbýti millum hondbóltsfeløgini) 15 tímar og Fleyr fær 20 tímar.

Umframt venjing kunnu kappingardystir eisini vera á Argjahamri, og trýstið verður tað minni á Høllina á Hálsi og á Hoyvíkshøllina. Verkætlanin er tískil áhugaverd, tí talan verður um lutfalsliga høga nyttu fyri ein sámiligan kostnað.

***Onnur viðurskifti í byggitíðini***

Byggingin fer at órógva virksemið í skúlanum nakað, bæði virksemið í høllini, í skúlanum sum heild og tað kvøldskúlavirksemi, sum er í skúlanum, serliga í sambandi við sprongiarbeiðið, og tá veggurin vestureftir verður tikin niður. Hetta krevur neyva ráðlegging saman við skúlanum og Ítróttaranleggum, ið samskipar tað virksemið, sum er í høllini eftir skúlatíð. Tí má byggingin í ávísan mun lagast til skúlan, virksemið hjá Ítróttaranleggum, feløgini, sum brúka høllina og til Kvøldskúlan.

***Fyrireikingar***

Til tess at realisera hesa ætlan, er uppskot at fara undir samskifti við P/F Articon og P/F MAP arkitektar um verkætlanina. Hetta grundað á, at talan er um feløg, ið vóru við í upprunaligu verkætlanini, og at fleiri fyrimunir eru í at halda fram við somu feløgum. Úrslitið av hesum verður so grundarlag fyri endaligari støðutakan um bygging.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at fara undir samskifti við omanfyri nevndu feløg um útbygging av høllini í Skúlanum á Argjahamri at leggja fyri nevndina aftur í november 2015.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**

Samráðingar hava verið við P/F Articon og P/F MAP Arkitektar um málið og fyriliggur nú møguleiki fyri at gera avtalu, har feløgini saman við kommununi halda fram í upprunaliga partalagnum um Skúlan á Argjahamri uppá hesa útbyggingina, sum kann verða framd fyri 15,5 mio.kr. umframt kommununar MVG á 6,25%. Verkætlanin kann byrja í desember 2015 og verða avhendað til skúlaársbyrjan 18. august 2016.

Í máli nr. 14/04763 sæst nærri frágreiðing um, hvussu henda útbygging gevur fleiri hallartímar til feløgini í høvuðsstaðnum. Talva við tímum í høllunum er viðfest.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at gera endaliga avtalu um partalag uppá útbyggingina fyri í mesta lagi kr. 15,5 mió umframt mvg, og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Útsett til komandi fund.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Útsett.

**Mentamálanevndin 25. november 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur undir við av víðka høllina í skúlanum á Argjahamri, men mælir til at byggiarbeiðið verður boðið út millum byggifeløg.

Ein annar minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur undir við at víðka høllina í skúlanum á Argjahamri, men mælir til at arbeiðið verður boðið út.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at heita á umsitingina um at koma við nýggjum tilmæli til útbjóðingarhátt, sum verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina á eyka fundi.

**Ískoyti:**
Sum uppfylging uppá viðgerðina í fíggjarnevndini 2. desember 2015 verður mælt mentamálanevndini til at taka støðu til annan av tveimum útbjóðsháttum:

a). Undirhondsboð
b). Innboðin øvugt licitatión

Í báðum málum verður ásett eitt evsta mark fyri HVÚ (hondverkaraútreiðslur) á 12,5 mió.kr. Vinnandi tilboðið er tað, sum kemur tættast at tí ella lægri. Tilboðið skal skipast sum ein heildararbeiðstøka, sum fer yvir í eitt partalag saman við Tórshavnar kommunu og Sp/f MAP ark. sum ráðgeva.

**Útgreining av báðum útboðsháttunum:**
*Viðv. Undirhondsboði*
Mælt verður til at annar tilboðsgevarin verður P/F Articon og víst verður á ein annan. Ætlanin er síðani at fara á ástaðarfund við hesar við fyriliggjandi tilfari uppá verandi skúla og tilhoyrandi frágreiðing um ætlanina, og harfrá biðja um tilboð við støði í áður ásettari upphædd og fyribils atkomuvegi vestanfyri, so byggingin tarnar og órógvar skúlan minst møguligt. Vent verður síðani aftur til mentamálanevndina og fíggjarnevndina við úrslitinum av tilgongdini.

*Viðv. Innboðin øvugt licitatión*
Ætlandi kann farast undir projektering primo januar og 3 mánaðir fram. Ráðgevaratoymið við Sp/f MAP ark. sum høvuðsráðgeva fær, treytað av hóskandi semju, uppgávuna vegna teirra leiklut og kunnleika til áður gjørda projektering av Skúlanum á Argjahamri. Síðani er ætlanin at hava innbodna licitatión í apríl 2016, og farast kann undir byggingina áðrenn

summarfrítíðina 2016. Innbjóðing verður send til 3-5 av teimum størri byggifeløgunum í Føroyum. Um hesin hátturin verður valdur, fer umsitingin í samráðingar við ráðgevaratoymið um projektering og vendir aftur til mentamálanevndina og fíggjarnevndina primo januar 2016.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu millum útboðsháttin undirhondsboð ella innboðin øvugt licitatión, sum lýst omanfyri og at heimila umsitingini at fremja neyðugar atgerðir í hesum sambandi og venda aftur til nevndina við einum úrsliti primo januar 2016.

**Mentamálanevndin 07. december 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Sigrun Mohr, mælir til at bjóða arbeiði út sum eitt undirhondsboð sum lýst omanfyri.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 09. december 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við mentamálanevndini og mælir býráðnum til at bjóða arbeiðið út í innbodna øvugta licitatión.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu.
Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus og Annfinn Brekkstein.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu.
Jógvan Arge, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur biðið Sp/f MAP arkitektar um at geva tilmæli um hvørji feløg skulu fáa møguleika at geva undirhondsboð uppá at útbyggja høllina í Skúlanum á Argjahamri. Sí

hjálagt tilmæli og tíðarætlan.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við tilmælinum hjá MAP at heita á TG Verk og Articon um at geva undirhondsboð uppá at útbyggja høllina í Skúlanum á Argjahamri.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Ein meiriluti Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
**Ískoyti:**
Tilboð uppá at útbyggja høllina í skúlanum á Argjahamri eru innkomin. Í útbjóðingartilfarinum varð somuleiðis biðið um alternativt tilboð at víðka áskoðaraplássini í verandi parti av høllini.

Tilboðini eru áljóðandi:

**Sp/f TG Verk:**

| | | |
|---|---|---|
| Tilboð | kr. | 16.983.149 uttan mvg. |
| Alternativt tilboð | kr. | 17.757.943 uttan mvg. |

**P/F Articon:**

| | | |
|---|---|---|
| Tilboð | kr. | 18.423.318 uttan mvg. |
| Alternativt tilboð | kr. | 19.083.662 uttan mvg. |

Umsitingin hevur sett í verk sparingar av tilboð hjá Sp/f TG Verk, sum hevði lægstu tilboðini. Alternativa tilboðið snýr seg í høvuðsheitum um at fáa áskoðarapláss framvið allari høllini, sambært viðheftu tekningum t.e. umleið 200 áskoðarapláss.

Ætlanin er at arbeiðið verður framt í partalagi millum Tórshavnar kommunu, Sp/f TG Verk og Sp/f MAP arkitektar.

Samlaði kostnaðurin á verkætlanina er áljóðandi:

| | | |
|---|---|---|
| Alt.tilboð hjá TG Verk við sparingum | kr. | 15.211.778 |
| Prosjektering, eftirlit, MAP ark. | kr. | 1.445.119 |
| Prosjektumsiting og byggileiðsla | kr. | 145.763 |
| Arbeiðstøkurygging o.a. | kr. | 45.000 |
| Ókent | kr. | 608.471 |
| Mvg (6,25%) | kr. | 1.043.869 |
| | | |
| **Tilsamans** | **kr.** | **18.500.000** |

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at skrivað verður undir partalagssáttmála millum Tórshavnar kommunu, Sp/f TG Verk og Sp/f MAP ark. og at játtað samlaða kostnaðin á 18,5 mio.kr. íroknað mvg at útbyggja høllina í skúlanum á Argjahamri, og at arbeiðið verður fíggjað av karminum til ítróttahallarbygging løgukonta 5775 ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur nú fingið gjørt sáttmálarnar klárar, ið liggja til grund fyri partalagnum í sambandi við bygginging av ítróttahøll í Skúlanum á Argjahamri.
Sí hjáløgd skjøl t.e. partalagssáttmáli við tilhoyrandi skjølum, umframt ráðgevarasáttmáli við Sp/f MAP ark. og arbeiðstakarasáttmáli við Sp/f TG-Verk. Eisini sæst mynd av nýggjari leið til arbeiðsvegin, ið er broytt í mun til viðgerðina seinast.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimilað at skrivað verður undir partalagssáttmála millum Tórshavnar kommunu, Sp/f TG-Verk og Sp/f MAP ark, umframt ráðgevarasáttmála við Sp/f MAP ark. og arbeiðstakarasáttmála við Sp/f TG-Verk

**Fíggjarnevndin 25. februar 2016:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

## 40/16 Lítliskúli, umsókn um f. ískúla við forskúla, frítíðarskúla og musikkskúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 6/16 | 15/01980-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 42/16 | 15/01980-5 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 40/16 | 15/01980-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 54/16 | 15/01980-5 |

**Málslýsing:**
Ein áhugabólkur arbeiðir við at seta á stovn fráskúla í Tórshavnar kommunu, sum ætlanin er at staðseta í Havn. Heitið á skúlanum er Lítliskúli.

Áhugabólkurin fyri Lítlaskúla hevur søkt Mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn fráskúla við næmingum úr fyrsta til og við sætta flokki. Umsitingin hevur enn ikki fingið fráboðan um, at umsóknin er játtað ella ikki.

Sambært § 4 í Løgtingslóg nr. 46 frá 26. mai 2002 um fráskúlar skal landsstýrismaðurin góðkenna ein fráskúla, áðrenn farast kann undir undirvísingina. Viðvíkjandi fígging og rakstri er virksemi hjá fráskúlum partvís fíggja við stuðli frá landi og kommunum. Írestandi fíggingin skal rindast við foreldragjaldi og/ella privatum stuðli. Sambært § 18 stk. 4 í fráskúlalógini rindar heimstaðarkommunan hjá næminginum kommunugjaldið, sum er 85% av rakstrarútreiðslum fyri hvønn næming í fólkaskúlanum. Rakstrarútreiðslurnar fyri hvønn næming í Tórshavnar kommunu er 12.000 kr. um árið, sostatt rindar Tórshavnar kommuna 10.200 kr. fyri hvønn næming i fráskúla.

Í umsókn dagfest 23. november 2015 søkir bólkurin Tórshavnar kommunu um stuðul til at seta á stovn forskúlaflokk, frítíðarskúlatilboð og musikkskúlatilboð frá august 2016.
Í umsóknini stendur, at arbeiðið í Lítlaskúla tekur støði í eini heildarfatan av læring og menning, har tey vilja gagnnýta breiddina av dugnaligum og kreativum starvsfólki, sum arbeiða tætt saman um at skipa gerandisdagin námsfrøðiliga og fakliga.

Í hvørjum árgangi skulu í mesta lagi vera 16 børn. Til samanberingar kann nevnast, at í vanliga fólkaskúlanum er talið 24 við skúlaárs byrjan, men kann fara upp á 26, áðrenn ein flokkur verður býttu í tveir.

Forskúli
Sambært fólkaskúlalógini § 4 stk. 4 kunnu kommunur seta 1 árs forskúlaflokk/ar á stovn eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin setur.

Í Tórshavnar kommunu eru tveir forskúlar, annar í Skúlanum á Argjahamri, tilsamans er pláss fyri 96 næmingum í forskúla í kommununi. Forskúlin er fíggjaður av kommununi og við foreldragjaldi. Skúlin á Fløtum verður bygdur til forskúla eisini, og har verður pláss fyri 72 næmingum í forskúla.

Útreiðslurnar pr. ár fyri hvørt barn í forskúla eru:

| | |
|---|---|
| Lønarútreiðslur | 32.665 kr. |
| Rakstrarútreiðslur | 12.000 kr. |
| Foreldragjald | 7.200 kr. |
| **Útr. Tils.** | **37.465 kr.** |

Lønarútreiðslurnar, sum eru brúktar í sambandi við útrokningina av rakstrarútreiðlum, eru tær, sum eru grundarlag undir fíggjarætlan 2016. Møgulig lønarbroyting í 2016 er uml. 2%.

Í Tórshavnar kommunu eru sostatt tvey tilboð til tey seks ára gomlu børnini. Foreldur kunnu velja at skriva barn inn í forskúla ella at halda fram í barnagarði til barnið hevur aldur at fara í fyrsta flokk. Forskúlatilboðið er tó avmarkað til tvey støð annað í miðbýnum og hitt á Argjum.

Í sambandi við umsóknina frá áhugabólkinum fyri Lítlaskúla, metir umsitingin, at av tí, at forskúlar ikki eru í øllum fólkaskúlanum í Tórshanvar kommunu, eigur kommunan ikki at játta, at forskúli verður í  Lítlaskúla. Um Tórshavnar kommuna seinni tekur støðu til, at forskúlatilboð verða í øllum fólkaskúlunum í kommununi, er støðan ein onnur, og friskúlarnar eiga tá at fáa møguleika at hava forskúla eisini.

<u>Frítíðarskúli</u>
Sambært ásetingum í Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, § 7. stk 2. kann kommunan geva øðrum t.d. fyritøkum og stovnum loyvi til at stovnseta dagstovn treytað av, at allar ásetingar í hesi lóg verða fylgdar.

Víst verður til, at kommunan í 2007 játtaði umsókn frá Frískúlanum í Havn at hava frítíðarskúla í frískúlanum.

Við tí verður mælt til at Lítliskúli kann hava frítíðarskúla fyri børnum í 1. og 2. floksstigi.

Kommunan  rindar kommunupartin pr. barn í frítíðarskúla.

<u>Musikkskúli</u>
Í umsóknini frá Lítla Skúla, ið er stovnsett sum ein sjálvsognarstovur, ið ætlandi skal byrja sítt skúlavirksemi í august 2016, er eisini ein umsókn um stuðul til at stovnseta ein musikkskúla vísandi til galdandi musikkskúlalóg - http://www.logir.fo/Logtingslog/69-fra-07-06-1984-um-studul-til-musikkskular-sum-broytt-vid-logtingslog-nr-67-fra

Í umsóknini stendur:
*"Fyri at lúka treytina í § 3 í løgtingslóg um stuðul til musikkskúlar, verður undirvísingin boðin út alment. Lutfallið millum undirvisingina fyri næmingum í Lítlaskúla og øðrum næmingum er umleið helvt um helvt. Endamálið við hesum er at skapa grundarlag fyri at bjóða næmingum eitt neyðugt útboð av ljóførum og at kunna bjóða undirvísing í samanspæli o.ø., eins og ásett er í § 2 í løgtingslóg um stuðul til musikkskúlar.*

*Til skúlaársbyrjanina í 2016 vænta vit, at tørvur er á at seta umleið 2 fulltíðarstørv til musikkundirvísingina. Tá skúlin er fullur skúlaárið 2020/2021, meta vit, at tørvur verður á umleið 4 ársverkum til musikkundirvísingina. Við hesum kann Lítliskúli, tá hann er fullur, hava í mesta lagi 200 børn í musikkskúlatilboðnum (uml. 100 av næmingunum koma tá uttanífrá). "*

umframt:

*"Í musikkskúlalógini er einasta áseting um stovnsskipan at finna í § 3, har kravið er, at skúlin skal verða knýttur at eini kommunu ella einum kommunalum felagsskapi. Fyri at skapa fortreytir fyri samskipan og samstarvi er okkara ynski, at ein leiðari verður settur at standa á odda fyri øllum virkseminum í Lítlaskúla. Sambært ásetingunum í § 15 í fríkúlalógini og § 8 í løtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, verður leiðari settur av stýrinum. Eingin áseting er í*

*løgtingslóg um stuðul til musikkskúlar um setan av leiðara, men sambært musikkskúlaskipanini setur kommunan leiðara. "*

umframt:
*"Tá tað snýr seg um setan av lærarum og starvsfólki, eru reglurnar ymiskar. Sambært § 15 í fríşkúlalógini setir stýrið lærarar og onnur starvsfólk. Sambært § 5 í kunngerð um skipan og læring í forskúla verða starvsfólk sett av skúlaleiðara í samráð við kommunu. Sambært § 8 í dagstovnalógini setur kommunan starvsfólk eftir tilmæli frá leiðara, og sambært § 5 í musikkskúlalógini setur landsstýrismaðurin lærarar eftir tilmæli frá kommunu ella nevndini fyri musikkskúlan. "*

umframt:

*"Vísandi til løgtingslóg um stuðul til musikkskúlar, søkja vit um stuðul til 50% av lønarútreiðslunum til tveir tónleikalærarar fulla tíð frá august 2016. Harumframt vilja vit søkja um stuðul til keyp av ljóðførum til musikkundirvísingina, og so skjótt vit hava fingið svar frá Mentamálaráðnum, verður nærri útgreining gjørd."*

Niðurstøða
Metingin hjá mentamáladeildini/Trivnaðarfyrisitingini er at ásetingin í § 3 einans fevnir um kommunalar musikkskúlar givið at orðingin sigur "skal skúlin, sum skal verða knýttur at eini kommunu ella einum kommunalum felagsskapi, verða góðkendur av landsstýrismanninum.". Tískil metir kommunan at Lítli Skúli ikki við verandi lógargrundarlagið kann søkja Tórshavnar kommunu um stuðul til m.a. 2 tónleikalærarar. Sum vit skilja lógina snýr hon seg í høvuðsheitum um at musikkskúlar kunnu søkja landið um studning til at reka kommunalar musikkskúlar ella kommunalum felagsskapum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarain mæla frá at góðkenna at seta á stovn forskúla í fríşkúlanum Lítlaskúla.

Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta fríşkúlanum Lítlaskúla frítíðarskúla til børn í 1. og 2. árgangi.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarain mæla frá at góðkenna musikkskúlatilboð í fríşkúlanum Lítlaskúla.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti**
Í skrivi dagfest 21. januar 2016 frá Mentamálaráðnum (sí hjálagt) viðvíkjandi umsóknini frá áhugabólkinum fyri Lítlaskúla verður boðað frá, at landsstýriskvinnan í mentamálum

góðkennir, at áhugabólkurin fyri Lítlaskúla setir á stovn fráskúla sambært § 4, stk. 1 í fráskúlalógini og forskúlaflokk sambært § 2, stk. 2 í fráskúlalógini. Góðkenning av forskúla er tó við teirri treyt, at Tórshavanr kommuna gevur tilsøgn um at bera útreiðslurnar av forskúlaflokkinum.

Skúlaárið 2016/-17 eru sambært skjalaváttanum, sum sendar eru Mentamálaráðnum saman við umsóknini, innskrivaðir 12 næmingar í forskúla, 12 næmingar í 1. flokk, 3 næmingar í 2. flokk og 22 næmingar í musikkskúlatilboðið.

Í skrivinum boðar Mentamálaráðið frá, at tað ikki kann góðkenna, at ein fráskúli virkar sum musikkskúli sambært musikkskúlalógini, sum serliga í mun til uppgávur og endamál víkir munandi frá tí undirvísing, ið fólkaskúlin vanliga kann bjóða.

<u>Forskúli</u>
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging frá november 2011 er mælt til, at forskúlar verða í øllum skúlum. Umsitingin kemur í vár við einum dagførdum tilmæli til mentamálanevndina viðv. framtíðar skipan av forskúlum í kommununi, umframt framtíðar skipan av sonevnda 6 ára (skúlastovu)-tilboðnum á dagstovnaøkinum. Báðar skipanirnar virka í dag lið um lið.

Frá 2020 verður umframt núverandi forskúlar í Skúlanum á Argjahamri og Sankta Frans, eisini forskúli í Skúlanum á Fløtum, og møguleiki verður at skipa forskúla í hinum skúlunum eisini. Tó so at fleiri praktiskar avbjóðingar verða í tí sambandi.

Tískil er ikki heilt greitt í løtuni um forskúli skal verða eitt standardtilboð í kommununi, tað verið seg á kommunalu fólkaskúlunum og í fráskúlum.

Undir øllum umstøðunum vil eitt skiftið til forskúla sum standardtilboð innibera eina skiftistíð í eini 5 ár har neyðugar umstøðurnur verða fingnar til vega.

Í mun til ítøkiligu umsóknina hjá Lítlaskúla um forskúla, sum so aftur hevur sum fortreyt ein frítíðarskúla til forskúlan, so er tað galdandi, at kommunan rindar hesi tilboð 100% við støði í eindarkostnaðinum, ið kommunan hevur á ávikavist forskúlatilboðnum og frítíðarskúlatilboðnum til forskúla. Fyri kommununa er forskúlatilboðið og tilhoyrandi frítíðarskúlatilboðið dýrari í rakstri enn dagstovnatilboðið til tey 6 ára gomlu. Ein tilsøgn til Lítlaskúla hesum viðvíkjandi økir tí prinsippielt eisini um játtanartørvin á fíggjarætlanini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at nevndin tekur støðu til um forskúli skal kunna verða settur á stovn í fráskúlanum Lítlaskúla og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Samtykt at játta fráskúlanum loyvi at reka forskúla og frítíðarskúla til forskúla sbrt galdandi reglum, og at avtala verður gjørd um fyrisiting av játtan.

**Ískoyti**
<u>Fígging:</u>
Sum omanfyri ávíst er forskúlatilboð og tilhoyrandi frítíðarskúlatilboð dýrari í rakstri enn dagstovnatilboð til tey 6 ára gomlu.

Í 2016 eru útreiðslurnar fyri hvørt barn í barnagarði 51.413 kr. netto (tvs. uttan foreldragjald). Útreiðslurnar fyri børn í frítíðarskúla til forskúla eru 30.359 kr. netto, og útreiðslurnar fyri børn í forskúla eru 37.465 kr. Eindargjaldið fyri børn í forskúla og tilhoyrandi frítíðarskúla er í alt 67.824 kr. netto.

Kostnaðurin fyri hvørt barn í forskúla og tilhoyrandi frítíðarskúla er sostatt 16.411 kr. netto hægri enn kostnaðurin fyri hvørt barn í barnagarði.

Sum skilst verða 12 næmingar í forskúla og frítíðarskúla til forskúla í Lítlaskúla komandi skúlaár. Meirútreiðslan fyri kommununa í eitt ár er sostatt 196.937 kr. fyri 12 næmingar. Fíggjartørvurin í 2016 er fyri tíðarskeiðið august- desember í 2016, tvs. 5 mánaðir, ið gevur eina meirútreiðslu uppá 39.387 kr.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við mentmálanevndini 10. februar og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 41/16 Innrætta heilsuhús í realskúlanum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.12.2015 | 46/15 | 15/04903-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 14/16 | 15/04903-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 9/16 | 15/04903-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 41/16 | 15/04903-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 55/16 | 15/04903-1 |

**Málslýsing:**
Ætlanin um Heilsuhús hevur verið og er framhaldandi sera týðandi partur av grundarlagnum fyri samlaðu Heilsu- og umsorganartænastuni.

Heilsuhúsið hugsast vera bæði ein bygnaðarlig eind og ein fysiskur bygningur. Hetta síðsta hevur tó mangla at fáa útint. Sum tíðin er gingin, er greitt, at tað er alneyðugt bæði fakliga, tænastuliga og trivnaðarliga fyri starvsfólkini at fáa skipað fysiska Heilshúsið sum skjótast, hetta eisini um politisku málini, ið býráðið hevur sett fyri Heilsu- og umsorganartænastuna, skulu kunna røkkast.

Heilsuhúsið er ein bygnaðarlig og faklig nýskipan, sum skal tryggja tvørgangandi og tvørfakligar loysnir uppá einstøku uppgávuna – t.e. rætta tænastan og/ella tilboðið til ítøkiliga tørv einstaka borgarans. Tvs. grundarlagið undir teirri heildartænastu, sum lógin áleggur, har allar borgarargongdir – vanligar eins væl og tær meira kompleksu/tvørfakligu og bráðfeingis, verða samskipaðar og samskapaðar.

Heilsuhúsið er fyrsta samband hjá borgarunum til tænastur og tilboð, og haðani verður borgarin visiteraður til tær tænastur og/ella tey tilboð, honum tørvar. Heilsuhúsið skal tí vera eitt virkið og dynamiskt hús, sum framleiðir bestu tænastur og tilboð málrættað til einstaka borgaran og strategiskt í mun til langtíðar tørv, og sum altíð brúkar tvørfakliga, starvsfólkaliga og fíggjarliga tilfeingið í Heilsu- og umsorganartænastuni mest optimalt.

Fyri tíð síðan er fráboðað ætlan um, at Heilsuhúsið skal halda til í gamla realskúlanum. Ætlanin er, at allur realskúlin skal brúkast til Heilsuhúsið. Til tess eru nøkur brunakrøv og krøv um atkomuviðurskifti, sum skulu uppá pláss, umframt onnur arbeiði við el, kt o.ø. Um allur bygningurin skal takast í nýtslu í einum, er kostnaðurin mettur til uml. kr. 6 mió íroknað øll brunakrøv, atkomuviðurskifti (rampu við automatiskari úthurð), el- og kt-leiðingar, innbúgv, útgerð v.m.

Ein avmarkað loysn at byrja við, har bert niðara hæddin verður tikin í nýtslu, verður mett at kosta uml. kr. 1,5 mió.

Heimatænastan og móttøkan, sum í dag eru í leigaðum hølum í gomlu Dimmalætting á Hálsi, hevur einki stað at vera eftir 1. januar 2016. Leigumálið átti upprunaliga Almannaverkið, og tað gongur út á nýggjárinum, og gangast kann ikki undir treytir frá útleigarunum (Eik banki) til framhald av leigumálunum.

At fáa høli til heimatænastuna og móttøkuna í seinasta lagi pr. 1. januar 2016 hevur tí bráðskund.

Til tess at kunna flyta inn í bygningin skjótt, er gjørd ein innrættingarætlan fyri niðaru hæddina, sum í mestan mun livir upp til ætlaðu fyrimunirnar við at skipa eitt Heilsuhús. Sambært hesi innrættingarætlan flytur øll heimatænastan, leiðslutoymið, móttøkutoymið, visitatiónstoymið og dygdartoymið inn í realskúlan, eins og at klinikkin verður skipað sum ætlað.

Heimavitjanartænastan (gl Heilræði) og terapeuttoymini verða ikki flutt í Heilsuhúsið í hesum umfari. Mál má tí vera, at fígging fæst til vega at fáa loftið gjørt seinni í 2016 ella í 2017 til tess at hesar og møguligar aðrar viðkomandi funktiónir eisini kunnu flyta inn, so sum upprunaliga ætlanin við Heilsuhúsinum er.

Av arbeiðum, sum skulu gerast fyri at taka niðaru hædd í nýtslu til Heilsuhús, er at rudda kjallaran fyri alt eldfimt, at gera nøkur neyðug brunaátøk í kjallaranum (at gipsa), at fáa gjørt ymiskt el- og kt arbeiði, at gera rampu uttanfyri og automatiska úthurð til at lúka krøv um atkomu, lásaskipan v.m. Harumframt at fáa til vega innbúgv og neyðuga útgerð. Øll arbeiðini verða ikki liðug til 1. januar 2016, men nakað inn í 2016. Eftir ætlan ber tó til at fáa skipað heimatænastuna og telefonmóttøkuna á nýggjárinum.

Á grein 2 íløgukonta 2775 eldrarøkt eru tøkar kr. 368.000. Játtanin er ikki markað til ávíst endamál. Henda kann sostatt nýtast til at fíggja part av fíggjartørvinum til at innrætta Heilsuhúsið.

Á løgukarminum 2016 á grein 2 er harumframt kr. 1 mió sett av til verkætlan, sum skal lýsa tørv og møguleikar sum grundarlag fyri at gera langtíðarstrategi til tess at útvega hóskandi íbúðir og røktarbúpláss annars (j.nr. 15/04601). Verkætlanaruppskot verður latið trivnaðarnevndini á fyrsta fundi í januar 2016. Talan er um sera týðandi strategiska verkætlan fyri Heilsu- og umsorganartænastuna og kommununa sum heild, at mett verður á ongan hátt skilagott at brúka játtanina til innrætting av Heilsuhúsinum ístaðin.

Trivnaðarnevndin hevur ikki aðra íløgujáttan at ráða yvir.

Tørvur er sostatt á kr. 1,2 mió aftrat, sum mett verður má fáast til vega á samlaða íløgukarminum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til, at Heilsuhús í fyrsta umfari verður skipað bert í niðaru hæddini í realskúlanum og í hesum sambandi at játta kr. 368.000 á íløgukontu 2775 eldrarøkt til innrætting, myndugleikakrøv, el- og kt arbeiði, innbúgv, útgerð v.m. Harumframt verður mælt til, at trivnaðarnevndin fær til vega aðrar kr. 1,2 mió til arbeiðið á íløgukarminum.

**Trivnaðarnevndin 16. desember 2015:** Ein meiriluti, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Halla Samuelsen og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur ikki undir við tilmælinum grundað á, at umvælingin verður ov dýr og hølini óegnað til endamálið. Mælt verður ístaðin til at byggja nýtt til tess at røkka endamálinum við Heilsuhúsinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í trivnaðarnevndini og játtar kr. 368.000 á íløgukontu 2775 eldrarøkt til innrætting, myndugleikakrøv, el- og kt arbeiði, innbúgv, útgerð v.m og aðrar kr. 1,2 mió til arbeiðið av konto 6110, umsiting og røkt av bygningum. Málið beint í býraðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu í býráðnum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal um heldur at byggja nýtt til tess at røkka endamálinum við Heilsuhúsinum, grundað á at umvælingin verður ov dýr og hølini óegnað til endamálið, ið fall 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen

Greiddi ikki atkvøðu:
Elin Lindenskov,

Síðan var atkvøtt um meirilutatilmæli í trivnaðarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

**Ískoyti:**
Víst verður tilmælið omanfyri, har komið er fram, at upphæddin kr. 368.000 av íløgukontu 2775 eldrarøkt ikki er røtt. Rætta tøka upphæddin á nevndu kontu er kr. 315.000, og skal hetta rættast við nýggjari samtykt. Talan er um ein part av fíggingini til at innrætta heilsuhús í realskúlanum. Hin parturin er kr. 1,2 mió, sum býráðið hevur játtað av kontu 6110 umsiting og røkt av bygningum.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin mælir til at rætta hetta soleiðis, at kr. 315.000 verða játtaðar av íløgukontu 2775 eldrarøkt.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 315.000 av íløgukonto 2775 eldrarøkt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 42/16 Umsókn vegna Sp/f Katrina Christiansen um broyting av nýtslu og brúksloyvi til altan og rýmingartrappu á almennum øki.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 38/16 | 16/00325-9 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 62/16 | 16/00325-9 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 42/16 | 16/00325-9 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tummas Justinussen søkir, vegna sp/f Katrina Christiansen, um loyvi at seta eina rýmingartrappu á kommunala ogn og gera ein svala, sum somuleiðis kemur inn á alment øki.

Orsøkin er, at ætlanin er at gera gomlu handilshúsini á matr. nr. 80, Bringsnagøtu 6, Tórshavn, til matstovu/café/samkomuhús.

Í tí sambandi verður bygningurin umvældur uttan, t.v.s. at úthurðar og vindeygu verða skift, verandi klædningur verður tikin burtur, húsini verða bjálvað og kløðd av nýggjum.

Innan vil man gera sum minst fyriuttan at taka burtur alt tað, sum millum ár og dag er koyrt uppá veggir og gólv og annars at varðveita sum mest av tí gamla.

Kommunan hevur sett sum krav, at m.a. kunngerð nr. 88 frá 9. november 1999 um brunaverju og brunatrygd (KBB-99), verður fylgd.

Sambært KBB-99 skulu rýmingarmøguleikarnir verða góðir og ber tað illa til at lúka hesi krøv, uttan at farið verður út um matrikulmark.

Tað er m.a. neyðugt við eini rýmingartrappu av loftinum, sum verður staðsett uttandura vestanfyri og kemur einar uml. 4 m inn á matr. nr. 79, sum er kommunal ogn.

Harumframt er ynski um at fáa ein svala/altan uppi á loftshæddini eystanfyri, sum kann bøta um bjargingarviðurskiftini.

Av tí at bygningurin stendur í mark, kemur svalin at taka seg inn á alment øki, matr. litra ø, sum er gøta í millum húsini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 1. grundumráði í almennu byggisamtyktini og í serstøku byggisamtyktini nr. 5, økið millum Húsabrúgv og Áarvegin har tað er ásett:

> «Økið kann bert verða nýtt til handilsbúðir, skrivstovur, fyrisiting, heilsubótarhøli og tílíkt við hartil hoyrandi bilplássum. Tó kunnu tvær ella tríggjar av teimum ovastu húsahæddum í eini møguligari samlaðari nýbygging eftir nærri góðkenning býráðsins, allar sum tær eru ella lutvís, verða inrættaðar til íbúðir Ognirnar matr. nr. 70, 80, 85, 86, 89 b og 90 kunnu eftir nærri góðkenning býráðsins, allar sum tær eru ella lutvís, verða nýttar til bústaðir.».

**Upplýsingar frá umsitingini**
Grundøkið matr. nr. 80, Tórshavn, er 183 $m^2$ til víddar. Á ognini eru ábygd eini hús á uml. 77 $m^2$ í tveimum hæddum umframt kjallara og loft. Eisini er ein hjallur á ognini, sum verður gjørdur til bústað.

**Umhvørvisárin**
Viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarlig viðurskifti**
Ongar bindingar fyri kommununa

**Skjøl**

| | |
|---|---|
| 16/00325-8 | Katrina C - Kortmynd |
| 16/00325-10 | TAS(99)03 – Síðumynd av trappu |
| 16/00325-10 | TAX(99)04 – a. flatmynd við svala |
| 16/00325-10 | TAX(99)04 - b. flatmynd við rýmingartrappu |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti og at beina málið í fíggjarnevndina viðv. nýtslu av kommunalum øki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 43/16 Leigusáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Lions Club Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 03.02.2016 | 49/16 | 16/00853-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 43/16 | 16/00853-1 |

**Málslýsing:**
Lions Club Tórshavn hevur borið fram ynski um at leiga høli í ovastu hædd í Müllers pakkhúsi til felagsvirksemi og almannagagnlig tiltøk annars. Lions Club Tórshavn hevur serligan áhuga fyri júst hesum bygninginum, sum teir um aldarskiftið tóku stig til at varðveita. Lions Club Tórshavn vil – umframt vanliga felagsvirksemi – eisini standa fyri tiltøkumm, framsýninginum v.m., sum styðja undir og styrkja ætlanina við Müllers pakkhúsi sum virkið og fjølbroytt mentanarstað og umboðanarhús býarins.

Gjørt er uppskot til leigusáttmála.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at góðkenna uppskotið til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 03. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

Eisini samtykt at endurskoða reglugerðina fyri húsið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

## 44/16 Avtala viðvíkjandi Koda

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 49/16 | 14/05415-14 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 56/16 | 14/05415-14 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 44/16 | 14/05415-14 |

**Málslýsing:**
Mentamáladeildin/Trivnaðarfyrisitingin og løgdeildin hava í fleiri umførum havt samráðingar við Koda og Gramex um eina rættindaavtalu fyri Tórshavnar kommunu til at brúka vard verk. Loksins er komið til eitt samráðingarúrslit t.e. ein 3 ára avtala, ið fevnir um alt verandi virksemi hjá Tórshavnar kommunu, undantikið Reinsaríið&Perlan, ið hava serstaka avtalu. Sí avtaluna hjálagda.

**Tilmæli:**
Trivnaðastjórin, mentamálaleiðari og løgdeildarleiðarin mæla nevndini til at samtykkja uppskotið og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

## 45/16 Miðbýarætlan - Steinatún

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 61/14 | 14/05065-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 331/14 | 14/05065-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 258/14 | 14/05065-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 240/15 | 14/05065-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 49/16 | 14/05065-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 58/16 | 14/05065-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 45/16 | 14/05065-1 |

### Málslýsing:

Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Zeta arkitektar, sum fingu fyrstu virðisløn í kappingini hava gjørt eina fyribils kostnaðarmeting fyri 1. byggistig av prosjektinum við Steinatún. 1. byggistig fevnir um betraði ferðsluviðurskifti, nýggjan flísa- og steinbelegning, uppfylling av steinagøtu oman ímóti Bank Nordik bygninginum, nýggja uppihaldstrappu við Tilhaldið, ljós og planting.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, sum ikki er gjøgnumarbeitt, og er tí rættiliga óviss. Hædd er heldur ikki tikin fyri møguligum trupulleikum við undirlendinum, og at arbeiðið skal ganga fyri seg á einum vegastrekki við nógvari ferðslu.

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 14,4 mió. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 17,4 mió.

Í sambandi við ætlanina, hevur umsitingin biði Rambøll um tilboð uppá eina ferðslukanning við simulering av broyttu umstøðunum við Steinatún. Rambøll kann gerða hetta fyri kr. 60.000,-.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3,109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.000 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

### Tilmæli:

Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini, sum er mett at kosta íalt 15-20 mió.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, eigur projekteringin at verða sett í gongd, umframt kanningar av leiðingum, ferðslukanning v.m.

Projekteringin er mett til kr. 1.300.000
Ferðslukanning er mett til kr. 60.000

Verður peningur játtaður, eigur tað at fara av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at gera eina ferðslukanning og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 60.000 av íløgum til miðbýarætlanina. Eisini samtykti nevndin, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti**:
Í sambandi við arbeiði við miðbýarætlanini, eru ymiskar kanningar gjørdar, umframt at ein meirnýtsla hevur verið í sambandi við arkitektakappingina, hetta er gjørt upp til íalt kr. 510.022,- harav kr. 181.418,75 er meirnýtsla og kr. 328.603,25 til ymiskar kanningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. 60.000,- til ferðslukanning við Steinatún, umframt kr. 510.022,00 til at gjalda omanfyri nevndu rokningar, soleiðis at tað íalt verða játtaðar kr. 570.022,00 av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at játta kr. 60.000 til ferðslukanning við Steinatún, ið verður at játta av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Ferðslukanningin av Steinatúni, sum bleiv samtykt at gera á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 28. november 2014, er nú liðug.

Ferðslukanningin tekur støði í verandi viðurskiftum, grundað á teljingar av bilum, gangandi fólki og bussleiðini í Steinatúni í meldurtíðini frá kl. 15.30 til 16.30 ein vanligan dag.

Miðað var eftir loysnum at tøma Steinatún fyri bilar i tíðarbilum við ferðsluljósum við Niels Finsens gøtu og Tórsgøtu samsvarandi vinnandi projektuppskotinum frá arkitektakappingini fyri miðbýin frá ZETA arkitektar.

Niðurstøðan í kanningini vísir, at miðal bilrøðirnar við Steinatún í meldurtíðini vilja verða nakað longri enn í dag, meðan longstu bilrøðirnar verða somu longd sum í dag.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um peningur skal játtast til projektering av 1. byggistigi av projektinum við Steinatún.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt skipanaruppskot fyri Steinatún. Sí Hjáløgdu skitsu j.nr. 14/05065-8. Býarskipanardeildin mælir til, at játtaðar verða kr. 500.000 av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, til projektering av Steinatúni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 500.000 kr. av konto 6275 Fríðkan av kommununi til projektering av Steinatúni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

## 46/16 Miðbýarætlan – Heildarætlan fyri miðbýin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 52/16 | 16/00491-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 60/16 | 16/00491-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 46/16 | 16/00491-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), er ynski at gera eina ítøkiliga heildarætlan, vanliga kallað Miðbýarætlan, fyri miðbýin.

Endamálið við at gera eina Miðbýarætlan er, at neyðugt er at hava eina heildarætlan fyri býin, soleiðis at øll vita ítøkiliga hvørjar ætlanir vit sum kommuna og býráð hava fyri býin.

Vinnaraprojektið hjá Zeta arkitektum kemur at liggja til grund fyri gerð av Miðbýarætlanini, men er endamálið somuleiðis, at politikarin, borgarin og annars avvarðandi áhugapartar gerast partur av hesi heildarætlan. Ætlanin er bæði at hoyra omanfyri nevndu partur og eitt nú eisini partarnar, sum luttóku í hugskots- og prosjektkappingini.

Við at fáa uttanhýsis og innanhýsis fakfólk, umframt politikarnar at siga teirra hugsan og hugskot fyri miðbýin, meina vit, at vit á bestan hátt fáa eina haldgóða ætlan fyri miðbýin.

Endaliga úrslitið skal vera ein heildarætlan fyri ein samanhangandi miðbý, ymisku avbjóðingarnar sum miðbýurin hevur verða lýstar og ætlan verður gjørd fyri hesar. Heildarætlanin skal tryggja at framtíðar verkætlanir verða mentar og settar í verk í samsvari við ítøkiligu visiónirnar fyri býin og yvirskipaðu býarskipanarligu planleggingarprinsippini.

Miðbýarætlanin skal somuleiðis virka sum ein íblástrarætlan, og verða við til at geva komandi byggiharrum og íleggjarum eitt ítøkiligt yvirlit yvir hvørjar ætlanin Býráðið hevur fyri býin.

Zeta arkitektar hava gjørt uppskot til hvussu tilgongdin av hesi Miðbýarætlanini skal skipast, soleiðis at vit í summar hava eina ítøkiliga ætlan fyri hvussu býurin skal mennast yvir tey komandi árini. Tilgongdin sæst í viðhefta skjali j.nr. 16/00491-2. Lagt verður annars upp til, at Miðbýarætlanin, líkasum Kommunuætlanin, verður dagførd hvørt 4. ár, soleiðis at møguligar broytingar í fortreytunum alla tíðina verða endurmettar í mun til visiónirnar og ítøkiligu ætlanirnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at játtaðar verða kr. 500.000 av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi til fremjan av Miðbýarætlanini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>25. februar 2016 | Blað nr.: 36<br><br>Formansins merki: |

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

## 47/16 Tilboð til ung í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kollafjarðarnevndin | 27.05.2015 | 4/15 | 14/03925-2 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 08.02.2016 | 3/16 | 14/03925-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 52/16 | 14/03925-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 66/16 | 14/03925-2 |
| 5 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 47/16 | 14/03925-2 |

Umboð frá trivnaðardeildini kemur inn at greiða frá málinum.

**Kollafjarðarnevndin 27. mai 2015:** Trivnaðarstjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Gongd er við at seta í verk eitt ungdómstilboð í Kollafirði.

Eftir ætlan verður ungdómstilboð í núverandi frítíðarskúla, saman við ymsum ávísum virksemi í skúlanum.

Ætlanin er at byrja við tveimum kvøldum um vikuna, týskvøld og leygarkvøld er í uppskoti.

Í næstum – helst í komandi viku – fer fyrireikarin at bjóða teimum ungu inn til eitt The-party. Ætlanin er at tey ungu skulu koma til orðanna, og koma við ymsum hugskotum til tilboðið.

**Kollafjarðarnevndin 08. februar 2016:** Leiðarin á barna- og ungdómsdeildini kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur sett sær fyri at skapa góðar og mennandi umstøður fyri ungdómin. Margarinfabrikkin varð sett á stovn í 1995, í 2009 varð ungdómshús sett á stovn í Nólsoy og í Hoyvík. Á heysti 2011 lat ungdómscafé upp á Norðasta Horni. Árið eftir varð ungdómstiboð eisini skipað í Kaldbak í Flatnakróki.

Játtan kr. 400.000 er sett á fíggjarætlanini 2016 til at seta á stovn eitt nýtt ungdómstilboð í Kollafirði. Ætlanin er at lata upp í seinnu hálvu av februar og at hava opið tvær ferðir um vikuna. Tað verður leiðslan á dagstovninum í Kollafirði, sum hevur yvirskipaðu leiðsluna og ábyrgdina av virkseminum og játtanini.

<u>Fyrireikingar og innihald:</u>
Dagstovnaleiðarin og starvsfólk hava kunnað seg við onnur av ungdómstilboðunum í kommununi. Eisini hava tey havt arbeiðsfundir saman við børnum og ungum í Kollafirði

bólkað í 4.-6. flokk og 7. flokki og uppeftir við sera góðari uppmøting og stórum áhuga, har tey umrøddu ynski til tilboðið.

Ætlanin er, at tilboðið verður staðsett í núverandi frítíðarskúla, hetta verður mett ein góð og praktisk loysn, har tey ungu eisini síggja seg fara at trívast best. Ynskini til innihald eru ymisk, tó mest ynski, sum hava samaband við at "vera saman", so sum kortspøl, borðspøl, galla og disko. Eisini komu tey ungu við ynski um at svimja í Kollafirði, og møguleiki er eisini at nýta høli í skúlanum og fimleikahøllina eftir tørvi. Ætlanin er eisini at arbeiða við prosjektum, eitt nú saman við Lailu av Reyni og Eileri Fagraklett.

Ætlanin er at hava opið hósdag og leygardag at byrja við. Tá verður hædd tikið fyri øðrum virksemi sum er í Kollafirði, og tøku játtanini.

Ungdómtilboðið í Kollafirði verður væntandi varandi skipan. Í hesum er skilabest, at virksemið hevur egna rakstrarkontu á sama hátt sum hini ungdómstilboðini á § 3 í fíggjarætlanini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at seta ungdómstilboð í Kollafirði í verk, og í hesum sambandi játtað kr. 400.000 av kontu 3216 til nýtt rakstrarstað konta 3316 Ungdómstilboð í Kollafirði.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 48/16 Gøtunavn til útstykking á matr. nr. 660a, Yviri við Strond, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 30.11.2015 | 10/15 | 15/04623-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 16.12.2015 | 267/15 | 15/04623-1 |
| 3 Gøtunavnanevndin | 29.01.2016 | 4/16 | 15/04623-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 30/16 | 15/04623-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 48/16 | 15/04623-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við útstykking av matr. nr. 660a (mál nr. 15/03346) verða fýra nýggj grundstykki. Hesi fýra grundstykkini og núverandi hús Yviri við Strond 63A skulu hava nýggja adressu, og tí heitir Tekniska deild á gøtunavnanevndina um at koma við uppskoti til navn til vegastubban, sum gongur frá vegnum Yviri við Strond inn á matr. 660A.

Kort eru viðheft.

**Gøtunavnanevnd 30. november 2015:** Nevndin mælir til, at navnið verður *Válgaratún* eftir Válgaravík.

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 16. december 2015:** Nevndin heita á gøtunavnanevndina um at koma við fleiri uppskotum.

**Gøtunavnanevndin 29. januar 2016:** Nevndin mælir til at halda fast við *Válgaratún* eftir Válgaravík, ið stavar frá skerinum Válgaranum.

Heitt er á nevndina um at koma við fleiri uppskotum, og nevndin hevur eitt uppskot aftrat, ið er *Sævartún*.

**Tilmæli:** Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at navnið verður Sævartún.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, mælur til at navnið verður Sævartún.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Sigrun Mohr, mælur til at navnið verður Válgaratún.

Ein annar minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

Málið verður beint í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Gøtunavnanevndini tann 30. november 2015, ið varð einmælt samtykt.

# 49/16 Vegamótið Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 26.05.2015 | 63/15 | 15/01756-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 03.06.2015 | 69/15 | 15/01756-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 12/16 | 15/01756-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 78/16 | 15/01756-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 49/16 | 15/01756-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við at betra um ferðslutrygdina við vegamótið Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka, hevur umsitingin gjørt eitt uppskot, har hávateninar verða fluttar út á Bøkjarabrekku, so útsýnið til vinstru verður betrað. Bøkjarabrekka verður í tí sambandi smalkað, soleiðis at vegbreiddin við vegamótið verður 6,5 m.

**Tilmæli**:
Ferðslunevndin skal taka støðu til uppskotið 15/01756-2.

**Ferðslunevndin 26. mai 2015:** Nevndin tekur undir við framlagda uppskoti. Málið beint í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við ferðslunevndini at, hávatenninar ovast uppi á Tinghúsvegnum verða fluttar longur út á Bøkjarabrekku, so útsýnið til vinstru verður betrað.

**Tekniska nevnd 03. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gongubreytin og kantsteinarnir í norðaru síðu á Bøkjarabrekku treingja til ábøtur og sama er við gongubreytini og kantsteinunum í sunnaru síðu, fyri tann partin sum er vestan fyri Tinghúsvegin.

Betur er um hesar ábøtur verða gjørdar, áðrenn hávatenninar á vegamótinum Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka verða fluttar út á Bøkjarabrekku, samsvarandi undanfarnu samtykt hjá teknisku nevnd.

Umsitingin hevur ynski um at fáa útvegað pening til at útføra omanfyri nevnda arbeiði og heimild til at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión ella undirhondsboð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 1 mió. Av íløgujáttanini fyri 2016 á kto. 8175 Aðrar verkætlanir til útbjóðingartilfar í sambandi við ábøtur á gongubreytirnar í Bøkjarabrekku og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Málslýsing:**
Í sambandi við at betra um ferðslutrygdina við vegamótið Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka, hevur umsitingin gjørt eitt uppskot, har hávateninar verða fluttar út á Bøkjarabrekku, so útsýnið til vinstru verður betrað. Bøkjarabrekka verður í tí sambandi smalkað, soleiðis at vegbreiddin við vegamótið verður 6,5 m.

**Tilmæli**:
Ferðslunevndin skal taka støðu til uppskotið 15/01756-2.

**Ferðslunevndin 26. mai 2015:** Nevndin tekur undir við framlagda uppskoti. Málið beint í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við ferðslunevndini at, hávatenninar ovast uppi á Tinghúsvegnum verða fluttar longur út á Bøkjarabrekku, so útsýnið til vinstru verður betrað.

**Tekniska nevnd 03. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gongubreytin og kantsteinarnir í norðaru síðu á Bøkjarabrekku treingja til ábøtur og sama er við gongubreytini og kantsteinunum í sunnaru síðu, fyri tann partin sum er vestan fyri Tinghúsvegin.

Betur er um hesar ábøtur verða gjørdar, áðrenn hávatenninar á vegamótinum Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka verða fluttar út á Bøkjarabrekku, samsvarandi undanfarnu samtykt hjá teknisku nevnd.

Umsitingin hevur ynski um at fáa útvegað pening til at útføra omanfyri nevnda arbeiði og heimild til at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión ella undirhondsboð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 1 mió. Av íløgujáttanini fyri 2016 á kto. 8175 Aðrar verkætlanir til útbjóðingartilfar í sambandi við ábøtur á gongubreytirnar í Bøkjarabrekku og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Málslýsing:**
Í sambandi við at betra um ferðslutrygdina við vegamótið Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka, hevur umsitingin gjørt eitt uppskot, har hávateninar verða fluttar út á Bøkjarabrekku, so útsýnið til vinstru verður betrað. Bøkjarabrekka verður í tí sambandi smalkað, soleiðis at vegbreiddin við vegamótið verður 6,5 m.

**Tilmæli**:
Ferðslunevndin skal taka støðu til uppskotið 15/01756-2.

**Ferðslunevndin 26. mai 2015:** Nevndin tekur undir við framlagda uppskoti. Málið beint í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við ferðslunevndini at, hávatenninar ovast uppi á Tinghúsvegnum verða fluttar longur út á Bøkjarabrekku, so útsýnið til vinstru verður betrað.

**Tekniska nevnd 03. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gongubreytin og kantsteinarnir í norðaru síðu á Bøkjarabrekku treingja til ábøtur og sama er við gongubreytini og kantsteinunum í sunnaru síðu, fyri tann partin sum er vestan fyri Tinghúsvegin.

Betur er um hesar ábøtur verða gjørdar, áðrenn hávatenninar á vegamótinum Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka verða fluttar út á Bøkjarabrekku, samsvarandi undanfarnu samtykt hjá teknisku nevnd.

Umsitingin hevur ynski um at fáa útvegað pening til at útføra omanfyri nevnda arbeiði og heimild til at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión ella undirhondsboð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 1 mió. Av íløgujáttanini fyri 2016 á kto. 8175 Aðrar verkætlanir til útbjóðingartilfar í sambandi við ábøtur á gongubreytirnar í Bøkjarabrekku og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.
**Málslýsing:**
Í sambandi við at betra um ferðslutrygdina við vegamótið Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka, hevur umsitingin gjørt eitt uppskot, har hávateninar verða fluttar út á Bøkjarabrekku, so útsýnið til vinstru verður betrað. Bøkjarabrekka verður í tí sambandi smalkað, soleiðis at vegbreiddin við vegamótið verður 6,5 m.

**Tilmæli**:
Ferðslunevndin skal taka støðu til uppskotið 15/01756-2.

**Ferðslunevndin 26. mai 2015:** Nevndin tekur undir við framlagda uppskoti. Málið beint í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við ferðslunevndini at, hávatenninar ovast uppi á Tinghúsvegnum verða fluttar longur út á Bøkjarabrekku, so útsýnið til vinstru verður betrað.

**Tekniska nevnd 03. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gongubreytin og kantsteinarnir í norðaru síðu á Bøkjarabrekku treingja til ábøtur og sama er við gongubreytini og kantsteinunum í sunnaru síðu, fyri tann partin sum er vestan fyri Tinghúsvegin.

Betur er um hesar ábøtur verða gjørdar, áðrenn hávatenninar á vegamótinum Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka verða fluttar út á Bøkjarabrekku, samsvarandi undanfarnu samtykt hjá teknisku nevnd.

Umsitingin hevur ynski um at fáa útvegað pening til at útføra omanfyri nevnda arbeiði og heimild til at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión ella undirhondsboð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 1 mió. Av íløgujáttanini fyri 2016 á kto. 8175 Aðrar verkætlanir til útbjóðingartilfar í sambandi við ábøtur á gongubreytirnar í Bøkjarabrekku og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Málslýsing:**
Í sambandi við at betra um ferðslutrygdina við vegamótið Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka, hevur umsitingin gjørt eitt uppskot, har hávateninar verða fluttar út á Bøkjarabrekku, so útsýnið til vinstru verður betrað. Bøkjarabrekka verður í tí sambandi smalkað, soleiðis at vegbreiddin við vegamótið verður 6,5 m.

**Tilmæli**:
Ferðslunevndin skal taka støðu til uppskotið 15/01756-2.

**Ferðslunevndin 26. mai 2015:** Nevndin tekur undir við framlagda uppskoti. Málið beint í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við ferðslunevndini at, hávatenninar ovast uppi á Tinghúsvegnum verða fluttar longur út á Bøkjarabrekku, so útsýnið til vinstru verður betrað.

**Tekniska nevnd 03. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gongubreytin og kantsteinarnir í norðaru síðu á Bøkjarabrekku treingja til ábøtur og sama er við gongubreytini og kantsteinunum í sunnaru síðu, fyri tann partin sum er vestan fyri Tinghúsvegin.

Betur er um hesar ábøtur verða gjørdar, áðrenn hávatenninar á vegamótinum Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka verða fluttar út á Bøkjarabrekku, samsvarandi undanfarnu samtykt hjá teknisku nevnd.

Umsitingin hevur ynski um at fáa útvegað pening til at útføra omanfyri nevnda arbeiði og heimild til at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión ella undirhondsboð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 1 mió. Av íløgujáttanini fyri 2016 á kto. 8175 Aðrar verkætlanir til útbjóðingartilfar í sambandi við ábøtur á gongubreytirnar í Bøkjarabrekku og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

## 50/16 Ferðsluviðurskifti við skúlan í Fríðrik Petersensgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 41/16 | 16/00850-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 75/16 | 16/00850-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 50/16 | 16/00850-1 |

**Málslýsing:**
Skúlastýrið hjá Skúlanum á Fløtum hevur í skrivi í januar 2016 víst á avbjóðandi ferðsluviðurskiftini kring eindina í Fríðrik Petersensgøtu. Í fjør vóru gjørdar ábøtur viðv. ferðslutrygdini, eitt nú er partar av økinum gjørt til 30 km/t zonu og betri uppmerking.

Fyri at bøta meiri um ferðslutrygdina og serliga við atliti til av- og áskipan av næmingum, er gjørt uppskot við eini loysn har tað niðan framyvir skúlanum í Fríðrik Petersensgøtu – umleið 10 metrar frá vegamótinum við Landavegin verður gjørd av- og áskipan fyri 4 bilar (kiss'n bye-'økið!) við støði í loysnini, ið áður er gjørd við fyrrv. Fráskúlan við Hoyvíkstjørn. Tó uttan kant millum av- og áskipanarplássini og koyribreytina og merkir hetta, at teir 4 bilarnir induviduelt kunnu sleppa út á vegin umvegis treytaleysa víkiskyldu.

Í gøtuni er eisini ein dagstovnur, og hann fer eisini kunnu fáa gagn av hesum nýggja møguleikanum.

Tekniska fyrisitingin hevur mett at loysnin kann fremjast fyri umleið 200 tkr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at heimila trivnaðarfyrisitingini saman við teknisku fyrisiting at fyrireika og fremja nevnda uppskot innanfyri ein fíggjarkarm á 200 tkr., ið skal fíggjast av 4140 Ætlanir á skúlaøkinum játtanini til útiøki hjá skúlum.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men játta upphæddina av løgukontuni 4176 Nýbygging skúlar (Skúlan á Fløtum) og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 51/16 Býlingavegur millum Blómubrekku og Villingadalsvegin 2. stig (2013-2048)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 16/16 | 16/00460-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 76/16 | 16/00460-5 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 51/16 | 16/00460-5 |

**Málslýsing:**
Nú ið fyrsti partur av býlingavegnum er gjørdur og handaður kommununi, eigur støða at verða tikin til, hvørt haldast skal fram við vegagerð á teimum umleið 120 metrunum, sum eru eftir at gera, frá íbindingini í útstykkingina hjá Sp/f Barni Poulsen, Baraldsgøta og fram til Villingardalsvegin.

Fyrsti partur av vegnum er gjørdur eftir prosjekti frá HMP-consult (j. nr. 2012-1353/1) fyri umleið kr. 14.000,- fyri meturin. Prosjektuppskot frá UP-Verkfrøði tókt (j. nr. 2010-1960/6), fyri tann partin av vegnum, sum eftir er at gera fram til íbinding í Villingardalsvegin.

Eingin kostnaðarmeting er tøk fyri henda seinna partin av vegnum, men av tí at stórur jarðarmunir eru móti grannaognunum á báðum síðum, sum krevja lutfalsliga høgar stuðlamúrar, má roknast við munandi størri metur kostnað enn á undanfarna parti. Við einum meturprísi álj. kr. 21.000,- til 25.000,- verður samlaði kostnaðurin fyri hetta vegastrekkið uppá ca. 130 m mettur til umleið 2,7 til 3,2 mió. kr.

Eftir prosjektuppskotinum, verða eisini umleið 25 ferðmetrar av lendi, at útvega hvørjumegin vegamótið við Villingardalsvegin burturav ávikavist matr. nr. 1363p og matr. nr 1362b. Harumframt nakrir fáir fermetrar av matr. nr. 1362b, Tórshavn.

Mett verður, at tað er umráðandi at fara undir vegaarbeiðið, áðrenn tað verður bygt ov tætt við markið til ætlaða vegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða kr. 250.000,- av markaðum íløgukørmum fyri vegir í sambandi við viðgerðina av ársfíggjarætlanini fyri 2014 til at gera liðugt prosjekt og útbjóðingartilfar at leggja fyri nevndina aftur, við støði í fyriliggjandi prosjektuppskoti frá UP-Verkfrøði og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. september 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á íløguætlan kommununnar fyri 2016, eru avsettar kr. 2 mió. til dagføring av Sundsvegnum.

Neyðugt er at dagføra Sundsvegin millum verandi rundkoyringar í einum og røkkur nevnda upphædd tí ikki til hesa dagføring.

Av tí at neyðugt verður at steingja Sundsvegin, tá hesin verður dagførdur, kann avsetta upphæddin við fyrimuni verða nýtt til at bøta um trongu ferðsluviðurskiftini, sum gerast millum Vegin Langa og Vestara Ringveg, meðan dagføringararbeiðið fer fram.
Hetta kann gerast við at gera býlingavegin millum Blómubrekku og Villingadalsvegin lidnan, soleiðis at onnur farleið eisini er tøk, meðan Sundsvegurin verður dagførdur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 2 mió. kr. av íløgujáttanini fyri 2016 til dagføring av Sundsvegnum (kto. 8175) til at gera liðugt prosjekt at seta í útboð við innbodnari lisitatión, og at beina málið, umvegis fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum vísandi til at hetta letur upp fyri at fjarhiti sleppur oman í býin.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, mælir til at dagføra Sundsvegin soleiðis, at fjarhitin kann fáast longur oman í býin og at heita á fíggjarnevndina at útvega størri játtan til endamálið.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 52/16 Umsókn um at TK yvirtekur vegin matr. nr. 38L, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 20/16 | 15/04164-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 79/16 | 15/04164-3 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 52/16 | 15/04164-3 |

**Málslýsing:**
Borgari á Traðartúni hevur vent sær til Tórshavnar kommunu við umsókn um, at kommunan yvirtekur privata vegøkið matr. nr. 38L, Argir.

Umsiting kommununar hevur støðulýst vegøkið (j. nr. 15/04168-2)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at boðað verður umsøkjaranum frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka vegøkið, ið er fevnt av nevnda matrikli, uttan kostnað fyri kommununa, tá umsøkjarin hevur fingið til vega tilfar og undirskriftir, ið eru neyðugar fyri at tinglesa ánaraskifti. At tilsøgnin er galdandi í 1 ár og at málið verður beint, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 53/16 Umsókn um at TK yvirtekur 855 m2 av vegøki undir Heygnum, matr. nr. 1001a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.02.2016 | 21/16 | 15/04168-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 80/16 | 15/04168-3 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 53/16 | 15/04168-3 |

**Málslýsing:**
Borgarar Undir Heygnum hava vent sær til Tórshavnar kommunu við umsókn um, at kommunan yvirtekur privata vegøkið matr. nr. 1001a, Tórshavn.

Umsiting kommununar hevur støðulýst vegøkið (j. nr. 15/04168-2)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at boðað verður umsøkjaranum frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka vegøkið, ið er fevnt av nevnda matrikli, uttan kostnað fyri kommununa, tá umsøkjararnir hava fingið til vega tilfar og undirskriftir, ið eru neyðugar fyri at tinglesa ánaraskifti. At tilsøgnin er galdandi í 1 ár og at málið verður beint, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 10. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 54/16 Sambindingarvegur Klingran - Tilboð upp á asfaltarbeiði frá rundkoyringini við endan á Løgmannabreyt og vestur um útstykkingina Oman Gil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.02.2016 | 23/16 | 16/00932-8 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 74/16 | 16/00932-8 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 54/16 | 16/00932-8 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við útstykkingina Oman Gil, so er ætlanin at asfaltera part av sambindingarvegnum Klingran frá rundkoyringini við endan á Løgmannabreyt og vestur um innkoyringina til nýggju útstykkingina Oman Gil. Talan er í fyrstu syftu um berilag á vegnum og asfalt á gongubreytini í niðara borð.

Umsitingin hevur heitt á ráðgevan HMP-Consult um at gera útbjóðingartilfar við umbøn um at bjóða út tveir arbeiðstakarar sum undirhondsboð. Teir bjóðandi eru EM-Asfalt og HJ-Asfalt.

Umsitingin hevur fingið eitt tilboð inn, og tað er frá HJ-Asfalt áljóðandi kr. 769.454,-.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Umsitingin hevur latið gjørt eina samlaða kostnaðarmeting áljóðandi kr. 2.350.000,-, men tá er roknað við at gera asfaltarbeiðið liðugt og leggja slitlag á sama vegastrekkið og asfaltera gongubreytina i ovara borð.

**Skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| Plantekning og tvørskurðir | TK j . nr. 16/00932-2 |
| Tilboð frá HJ-Asfalt | TK j . nr. 16/00932-6 |
| Samlað kostnaðarmeting | TK j . nr. 16/00932-7 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 2.500.000,- til arbeiðið, sum samsvarar við planløgdu játtanina fyri íløgur í 2016, §6, kto. 8175 Klingran, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 11. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 55/16 Ymisk asfalteringsarbeiði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 47/16 | 16/00684-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 24.02.2016 | 29/16 | 16/00684-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.02.2016 | 86/16 | 16/00684-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 55/16 | 16/00684-1 |

**Málslýsing:**
Politiskt ynski er um at raðfesta ymisk asfaltarbeiði í kommununi. Talan er um asfaltering av øki kring fjósið hjá Føroya Ríðingafelag (j.nr. 15/04662), økið kring fjósið hjá felagnum Føroyskt Íslendskt rossafelag (j.nr. 16/00128), asfaltering av atkomuvegi til virksemið í Havnardali (j.nr. 16/00129), asfaltering av vegøki við Berjabrekku (j.nr. 14/00356) og asfaltering av vegøki við Tórsbyrgi (j.nr. 14/00834).

**Tilmæli:**
Mælt verður fíggjarnevndini til at taka støðu til raðfesting av hesum asfalteringsarbeiði.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Samtykt at játta kr. 2.000.000 av konto 8112, ið verða at raðfesta soleiðis í mun til metta kostnaðin at gera niðanfyri nevndu asfaltarbeiði:

Kr. 200.000 til økið kring fjósið hjá Føroya Ríðingafelag, j.nr. 15/04662
Kr. 360.000 til økið kring fjósið hjá felagnum Føroyskt Íslendskt Rossafelag, j.nr. 16/00128
Kr. 210.000 til asfaltering av atkomuvegi til virksemið í Havnardali, j.nr. 16/00129
Kr. 500.000 til asfaltering av vegøki við Berjabrekku, j.nr. 14/00356
Kr. 500.000 til asfaltering av vegøki við Tórsbyrgi, j.nr. 14/00834

Málið beint í teknisku nevnd til avgreiðslu.

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal taka støðu til spurningin um fígging til útlegg av asfalteringini. Ætlanin er at konto 8112 skal leggja út fyri asfaltarbeiði álj. 2 mió. kr. fyri síðani at fáa útlegg játtað aftur seinni í ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til at samtykkja at játta kr. 2 mió. sum útlegg av kt. 8112, treytað av at býráðið, umvegis fíggjarnevndina, játtar somu upphædd í vár.

**Tekniska nevnd 24. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Sigrun Mohr luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2016:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Sigrun Mohr fór av fundi, meðan málið varð viðgjørt.

Einmælt samtykt.

## 56/16 Eigarafelagið Tórsbyrgi: Áheitan um asfaltering og flísar. 2013-1910

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 46/16 | 14/00834-7 |
| 2 Tekniska nevnd | 24.02.2016 | 25/16 | 14/00834-7 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.02.2016 | 88/16 | 14/00834-7 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 56/16 | 14/00834-7 |

**Málslýsing:**
Politiskt ynski er um at raðfesta ymisk asfaltarbeiði í kommununi. Talan er um asfaltering av øki kring fjósið hjá Føroya Ríðingafelag (j.nr. 15/04662), økið kring fjósið hjá felagnum Føroyskt Íslendskt rossafelag (j.nr. (16/00128), asfaltering av atkomuvegi til virksemið í Havnardali (16/00129), asfaltering av vegøki við Berjabrekku (j.nr. 14/00356) og asfaltering av vegøki við Tórsbyrgi.

**Tilmæli:**
Mælt verður fíggjarnevndini til at taka støðu til raðfesting av hesum asfalteringsarbeiði.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Víst verður til samtykt í máli 16/00684. Málið beint í teknisku nevnd til avgreiðslu.

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal taka støðu til spurningin um fígging til asfalteringina av økinum. Ætlanin er, at konto 8112 skal leggja út fyri arbeiðið fyri síðani at fáa útlegg játtað aftur seinni í ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til at samtykkja at játta kr. 500.000 sum útlegg av kt. 8112, treytað av at býráðið, umvegis fíggjarnevndina, játtar somu upphædd í vár.
Víst verður til tilmæli í máli nr. 16/00684 til eykafundin í teknisku nevnd 24.02.2016.

**Tekniska nevnd 24. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Sigrun Mohr luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2016:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 57/16 Eigarafelagið Berjabrekka 1 og Eigarafelagið Berjabrekka 2 : Umsókn um yvirtøku av vegi og gongubreyt inni á bústaðarøkinum á Berjabrekku 1 og 2 (2010-0819)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 45/16 | 14/00356-37 |
| 2 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 19/16 | 14/00356-37 |
| 3 Tekniska nevnd | 24.02.2016 | 24/16 | 14/00356-37 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.02.2016 | 87/16 | 14/00356-37 |
| 5 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 57/16 | 14/00356-37 |

**Umsókn um at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegin og gongubreyt inni á bústaðarøkinum á Berjabrekku 1 og 2**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eigarafeløgini fyri 1. og 2. byggistig á Berjabrekku søkja um, at kommunan formliga yvirtekur vegin og gongubreyt inni á teirra øki. Somuleiðis verður søkt um, at kommunan frameftir viðlíkaheldur vegirnar í síni heild, eisini viðvíkjandi kavarudding.

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á løgdeildini mælir til at málið verður beint í viðkomandi faknevnd(ir) til ummælis.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Samtykt ikki at ganga umsøknini á møti, vísandi til at vegaøkið inngongur í útrokningargrundarlagið fyri byggiloyvi til byggingina á Berjabrekku. Vegaøkið er at skilja sum partur av samlaða økinum og kann sostatt ikki skiljast frá nú, av tí at alt økið er roknað við, tá ið útstykkingarætlanin varð góðkend.

**Ískoyti:**
Eftirfylgjandi hava nevndu eigarafeløg sett fram ynski um at kommunan átekur sær at asfaltera vegirnar inni á Berjabrekku. Vegirnir eru í ógvuliga ringum standi. Á fundi hjá borgarstjóranum framførdu formenninir fyri eigarafeløgunum Berjabrekka 1 og 2 síni sjónarmið og hareftir varð ástaðarfundur hildin, so at kommunan kundi fáa sjón fyri søgn. Eigarafeløgini førdu fram, at vanligir skattgjaldarar ikki skuldu havt ábyrgd fyri at asfaltera veg, har almenningurin ferðast og serliga í hesum føri, tá ið kommunan sjálv stóð fyri útstykkingini. Harumframt søgdu formenninir seg ivast í hvør átti vegin. Tað er tó, sambært løgdeildini, ongin ivi um hvør eigur vegin, j.nr. 2010-0819/10. Sí eisini j. nr. 2000-2712 Yvirtøka av privatum vegum.

**Fíggjarligt:**
Sum avtalað á ástaðarfundinum, hevur umsitingin gjørt eina kostnaðarmeting, har asfaltering av øllum vegunum kostar yvir eina millión. Umsitingin hevur eisini gjørt eina aðra kostnaðarmeting, har kostnaðurin kann haldast á uml. kr. 600.000. Sí j.nr. 2010-0819/8.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla frá at ganga umbønini á møti, vísandi til at vegaøkið er privat ogn og annars við somu grundgevingunum sum fíggjarnevndin 16. juni 2010.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Eigarafelagið hevur aftur vent sær til kommununa við ynski um at fáa loyst viðurskiftini viðvíkjandi dagføring av vegunum inni á økinum á Berjabrekku.

Víst var millum annað á, at stórar lagdir eru í vegnum og at innkoyringin til Sundsvegin treingir til at dagførast.

Forkvinnan ynskir at viðgera málið.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at asfaltera Berjabrekku, men av tí at asfaltætlanin er samtykt, er ikki fíggjarligt rúm fyri arbeiðinum í ár. Heitt verður tí á fíggjarnevndina um at útvega fígging.

Nevndin samtykti eisini at beina málið í fíggjarnevndina, um at virka fyri at kommunan yvirtekur allar privatar vegir fyri á tann hátt at kunna røkja allar almennar vegir eins.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum og einari ætlan um at flokka allar vegir í kommununi við tí fyri eyga at útgreina leistin fyri møguligari kommunalari yvirtøku av vegunum.

Nevndarlimur hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Helena Dam á Neystabø og Bogi Andreasen, samtykti at málið verður tikið upp í sambandi við viðgerð av málinum um yvirtøku av privatum vegum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 22. mai 2012, har samtykt varð at asfaltera Berjabrekku og at arbeiðið verður gjørt í ár og fíggjað av játtanini til asfaltering. Somuleiðis vísir hon til samtyktina um at beina málið í fíggjarnevndina um at virka fyri at kommunan yvirtekur allar privatar vegir fyri á tann hátt at kunna røkja allar almennar vegir eins.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðið 16. september 2013:** Málið beint í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at heita á umsitingina um at gera eina reglugerð fyri kommunala luttøku í kostnaðinum at asfaltera privatar vegir.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 12. juni 2013.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini.

**Ískoyti:**
Ì framhaldi av niðurstøðunum í fíggjarnevndini 23. mai 2013, umframt í teknisku nevnd 12. juni 2013 og 24. oktober 2013, skal fíggjarnevndin taka støðu til asfaltering á Berjabrekku.

Sambært metingum, ið gjørdar vóru í sambandi við ástaðarfund við umboð í nevndini frá eigarafelagnum, er umsitingin komin fram til at kostnaðurin fyri asfaltering kann gerast eftir tveimum uppskotum. Víst verður annars til skjal nr. 14/00356-36 í málinum.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Tað eina uppskotið tekur støði í, at ein partur av høvuðsvegnum, har mest ferðsla er í Berjabrekku, verður asfalteraður frá Hitamiðstøðini til hús nr. 133/69. Kostnaðurin fyri hetta arbeiðið verður mettur til ca. kr. 220.000,-. Hitt uppskotið er eitt sindur meiri umfatandi og fevnir um asfaltarbeiði fyri allar vegir og parkeringsøki, og verður hetta mett til at kosta ca. 1,55 mió. kr.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Víst verður til samtykt í máli 16/00684. Málið beint í teknisku nevnd til avgreiðslu.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal taka støðu til spurningin um fígging til asfalteringina av økinum. Ætlanin er, at konto 8112 skal leggja út fyri arbeiðið fyri síðani at fáa útlegg játtað aftur seinni í ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til at samtykkja at játta kr. 500.000 sum útlegg av kt. 8112, treytað av at býráðið, umvegis fíggjarnevndina, játtar somu upphædd í vár.
Víst verður til tilmæli í máli nr. 16/00684 til eykafundin í teknisku nevnd 24.02.2016.

**Tekniska nevnd 24. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2016:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

## 58/16 Føroya Ríðingarfelag : Umsókn um at fáa vegin yvir til ríðihøllina og økið framman fyri fjósini asfalterað (2008-3427)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 21/16 | 15/04662-14 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 42/16 | 15/04662-14 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 18/16 | 15/04662-14 |
| 4 Tekniska nevnd | 24.02.2016 | 26/16 | 15/04662-14 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.02.2016 | 89/16 | 15/04662-14 |
| 6 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 58/16 | 15/04662-14 |

**Málslýsing:**
**Viðv. asfaltering á økinum hjá Føroya Ríðingarfelag**
Føroya Ríðingarfelag heitti í skrivi, dagfest 2. juli 2008, á Tórshavnar kommunu um at skipa fyri, at vegurin yvir til ríðihøllina og framman fyri nýbygdu fjósini hjá Føroya Ríðingarfelag í Havnardali verður asfalteraður.

Í skrivinum sigur felagið, at lovað varð, tá asfalterað varð í Havnardali, at kommunan eisini skuldi asfaltera nevnda veg, men avrátt varð at bíða við asfalteringini, so leingi arbeitt varð við stórum og tungum maskinum á økinum. Nú eru øll arbeiði við stórum maskinum á økinum liðug, og tí heitir Føroya Ríðingarfelag á kommununa um at asfaltera restina av økinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 150.000 av kontu 5366 Stuðul annars.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Útsett.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:**

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:**
Eftir áheitan greiddi trivnaðarstjórin frá leigusáttmálanum við Føroya Ríðingarfelag og skyldum, sum mett verður, at kommunan hevur um asfalt sum leigugjald, ið Barna- og ungdómsdeildin er biðin um at avgreiða. Vísandi til ivamál, sum nevndarlimir hava um sáttmálaskyldurnar, ynskir nevndin málið lagt fyri nevndina til næsta fund.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Málið varð umrøtt og útsett.

**Ískoyti:**
Til tess at halda sínar skyldur sbr. § 4 í sáttmálanum mælir borgarstjórin til at játta 450.000 kr. av konto 20910.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.**
Umsitingin hevur latið gera kostnaðarætlan av at asfaltera økið kring fjósið hjá Føroya Ríðingafelag.
Økið, sum Føroya Ríðingarfelag ynskja at fáa asfaltera nú er um ca. 1000 $m^2$ til støddar svarandi til eina íløgu álj. kr. 200.000.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Víst verður til samtykt í máli 16/00684. Málið beint í teknisku nevnd til avgreiðslu.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal taka støðu til spurningin um fígging til asfalteringina av økinum. Ætlanin er, at konto 8112 skal leggja út fyri arbeiðið fyri síðani at fáa útlegg játtað aftur seinni í ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til at samtykkja at játta kr. 200.000 sum útlegg av kt. 8112, treytað av at býráðið, umvegis fíggjarnevndina, játtar somu upphædd í vár.
Víst verður til tilmæli í máli nr. 16/00684 til eykafundin í teknisku nevnd 24.02.2016.

**Tekniska nevnd 24. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2016:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 59/16 Føroyskt Íslenskt Rossafelag : Umsókn um TK kann asfaltera vegin niðan til økið undir Kráarheyggi í Havnardali (2003-0301)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 22/16 | 16/00128-28 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 43/16 | 16/00128-28 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 16/16 | 16/00128-28 |
| 4 Tekniska nevnd | 24.02.2016 | 27/16 | 16/00128-28 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.02.2016 | 90/16 | 16/00128-28 |
| 6 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 59/16 | 16/00128-28 |

**Málslýsing:**
**Uppdyrkingarvegur til Føroyskt Íslendskt Rossafelag**
**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Sambært asfaltætlanini fyri árið 2004 er vegurin ikki tikin við, og er ynski um at fáa vegin asfalteraðan sambært skrivi, dagfest 3. februar 2003, frá Jón Gunnarsyni.

Í skrivi frá umsitingini er greitt frá, at áheitanin ikki kann verða gingin á møti orsakað av, at vegurin ikki er kommunalur.

Formaðurin í teknisku nevndini ynskir, at nevndin tekur støðu til, um kommunan skal gera neyðugar ábøtur, áðrenn farið verður undir asfalteringina.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Tekniska deild hevur gjørt leysliga kostnaðarmeting til at gera arbeiðiðliðugt.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2004**: Samtykt at játta kr. 400.000,00 av reguleringskontoini til ábøtur og asfaltering av vegnum og at beina málið í teknisku nevnd til kunningar.

**Tekniska nevnd 22. juni 2004**: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera kostnaðarætlan av at asfaltera økið kring fjósið hjá felagnum Føroyskt Íslendskt Rossafelag. Økið, sum felag ynskja at fáa asfalterað er um 1500 m$^2$. Økið er ikki planerað og sostatt í løtnuni ikki klárt til asfaltering. Kostnaður fyri samlaða asfaltarbeiðið er mettur til:

1) Planering ca 60.000,-
2) Asfaltering ca 300.000,-

**Tilmæli.**

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Víst verður til samtykt í máli 16/00684. Málið beint í teknisku nevnd til avgreiðslu.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal taka støðu til spurningin um fígging til asfalteringina av økinum. Ætlanin er, at konto 8112 skal leggja út fyri arbeiðið fyri síðani at fáa útlegg játtað aftur seinni í ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til at samtykkja at játta kr. 360.000 sum útlegg av kt. 8112, treytað av at býráðið, umvegis fíggjarnevndina, játtar somu upphædd í vár.
Víst verður til tilmæli í máli nr. 16/00684 til eykafundin í teknisku nevnd 24.02.2016.

**Tekniska nevnd 24. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2016:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 60/16 Asfaltering av parti av atkomuvegnum til virksemið í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 20/16 | 16/00129-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 44/16 | 16/00129-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 17/16 | 16/00129-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 24.02.2016 | 28/16 | 16/00129-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.02.2016 | 91/16 | 16/00129-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 60/16 | 16/00129-1 |

**Málslýsing:**
**Asfaltering av parti av atkomuvegnum til virksemið í Havnardali**
Sum partur av stuðli til frítíðarvirkesmið í Havnardali, er neyðugt at dagføra partar av atkomuvegnum. Umframt at kommunan hevur ætlanir um at lata stuðul til Føroya Ríðingafelag og Føroyskt Íslendskt Rossafelag, sum bjóða borgarum og øðrum ymisk frítíðartilboð so sum djóradagar v.m, er neyðugt, at peningur eisini verður játtaður til partar av sjálvum atkomuvegnum til økið.

Vegastrekkið, talan er um, er ca 350 m til longdar, og samlaða víddin er uml. 1675 $m^2$. Við einum dagførdum slitlagi verður kostnaðurin fyri asfaltarbeiðið uml. 210.000,-.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Víst verður til samtykt í máli 16/00684. Málið beint í teknisku nevnd til avgreiðslu.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal taka støðu til spurningin um fígging til asfalteringina av økinum. Ætlanin er, at konto 8112 skal leggja út fyri arbeiðið fyri síðani at fáa útlegg játtað aftur seinni í ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til at samtykkja at játta kr. 210.000 sum útlegg av kt. 8112, treytað av at býráðið, umvegis fíggjarnevndina, játtar somu upphædd í vár.
Víst verður til tilmæli í máli nr. 16/00684 til eykafundin í teknisku nevnd 24.02.2016.

**Tekniska nevnd 24. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2016:** Samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

## 61/16 Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 73/14 | 14/05161-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.02.2015 | 41/15 | 14/05161-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.03.2015 | 57/15 | 14/05161-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2015 | 97/15 | 14/05161-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 92/15 | 14/05161-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 190/15 | 14/05161-3 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 133/15 | 14/05161-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 279/15 | 14/05161-3 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.02.2016 | 55/16 | 14/05161-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 63/16 | 14/05161-3 |
| 11 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 61/16 | 14/05161-3 |

**Málslýsing**:
Tórshavnar kommuna hevur keypt ognina undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir, frá Valbjørn Dalsgarð.

Sambært uppruna ætlanini fyri Kongavarða skuldi ovasti parturin av økinum nýtast til raðhúsabygging, men kommunan hevur ætlanir at útstykkja økið til sethúsagrundstykkir.

Neyðugt er at gera skipanarætlan fyri alt økið.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin heimilar umsitingini:
- at umsitingin, saman við ráðgeva, ger eitt skipanaruppskot fyri alt økið, sum umfatar byggiøki, felags- og fríøkir, atkomuviðurskifti, vegir og gøtur v.m. og at gera eina fyribils kostnaðarmeting.
- at arbeiði, sum er mett at kosta kr. 100.000, í fyrsta umfari verður fíggjað av serkønari hjálp á teknisku fyrisitingini 1313.
- At skipanaruppskotið verður at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt skipanaruppskot fyri fyri ognina undir Kongavarða. Eftir uppskotinum er pláss til 30 raðhús, 4 íbúðarhús og 50 grundstykkir til sethús.Fyri at náa einum talið uppá 50 grundøkir til sethús, er tó neyðugt at gera eitt makaskifti uppá uml. 1500 $m^2$ við Búnaðarstovuna, soleiðis at teir fáa uml. 1500 $m^2$ burtur av matr. nr. 255a fyri uml. 1500 $m^2$ av matr. nr. 4a Kirkjubøhagi Fyri Handan, Poul Müller festari.

Atkomuvegurin niðan til tey 50 sethúsagrundstykkini er uml. 375 m, max hall er 120 promillu. Hesin vegurin er mettur at kosta uml. 6,5 milliónir. Hesin vegurin kann verða atkoma til fleiri grundstykkir, um kommunan fær ognað sær meira lendi burtur av matr. nr. 4a.

Grundstykkini eru uml. 400 $m^2$ til støddar.

Tað ber ikki til at gera eina kostnaðarmeting út frá verandi tilfari.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við skipanaruppskotinum, at abeiða víðari við at gera eina kostnaðarmeting og løgdeildin tekur samráðingar upp við Búnaðarstovuna um makaskiftið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við skipanaruppskotinum og gjørt tilhoyrandi kostnaðarmeting. Fyri at minka um hallið á býlingsvegnum, eru smávegis broytingar gjørdar í ætlanini. Fyri at fáa so gott útsýni sum møguligt frá hvørjum grundstykki sær, verður arbeitt við fastløgdum planeringskotum . Sí skjal nr. 4 og 5.

1. Býlingsvegur til 4 íbúðarblokkar og p-pláss til 24 íbúðir. Býlingsvegurin er 200 m langur og pláss er fyri 2 bilum til hvørja íbúð.
2. Býlingsvegur til útstykking við 50 grundstykkjum. Býlingsvegurin er umleið 345 m langur, og gongubreyt er uttarumegin vegin. Partar av vegnum krevja nógv fyrireikandi lendisarbeiði. Hægsta veghall er umleið 120 promilli.
3. Sethúsavegur við 50 grundstykkjum. Vegurin er 490 m langur, 9 m breiður, og 1,5 m breið gongubreyt er báðumegin. Hægsta veghall er umleið 100 promilli.

Viðheft er kostnaðarmeting við mettum kostnaði á

Skjal nr. 1. Býlingsvegi til íbúðarblokkarnar
Skjal nr. 2. Útstykking undir Kongavarða
Skjal nr. 3. Býlingsvegi til útstykkingina undir Kongavarða

Viðheft er eisini

Skjal nr. 4. Útstykking og atkomuvegur.
Skjal nr. 5. Útsýni

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at seta í gongd projektering av projektuppskoti við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri nummar 2. Býlingsveg til útstykking, og nummar 3. Sethúsaveg við 50 grundstykkjum, at uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørt, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
LBF hevur gjørt útbjóðingartilfar til útstykkingina við 48 grundstykkjum. Afturat uppruna uppskotinum er gjørt 2 felags parkeringspláss í útstykkingini og gongubreyt og súkklubreyt báðu megin atkomuvegin. Projektið er granskað og góðkent við smávegis broytingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða útstykkingina út í almennari lisitatión og at innkomnu boðini verða løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina skjótast gjørligt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Ískoyti:**
Tekniska nevndin skal taka støðu til vegaføringina og teknisku veitingarnar í sambandi við útstykkingarætlanina.

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum og tekniska stjóranum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 2. oktober 2015. Nevndin hevur tó hesar viðmerkingar:

- Býlingsvegur til íbúðarblokkarnar (skjal 1) skal hava gongubreyt á báðum síðum.
- Útstykking undir Kongavarða (skjal 2) – vegurin skal hava gongu- og súkklubreyt á báðum síðum.
- Býlingsvegur til útstykkingina undir Kongavarða (skjal 3) – skal hava gongubreyt á báðum síðum.

Nevndin tekur ikki støðu til útbjóðingarhátt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal taka støðu til samtyktina hjá Byggi- og býarskiparnevndini 02. oktober 2015 og samtyktina hjá Teknisku nevnd 04. november 2015.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, samsvarandi samtykt byggi- og býarskipanarnevndarinnar tann 2. oktober 2015 og eftirfylgjandi býráðsnevndarsamtyktum, boðið arbeiðið at gera atkomuvegin og útstykkingina út í innbodnari lisitatión.

Inn komu fylgjandi tilboð og tilboðsupphæddir:

| | |
|---|---|
| Sp/f TG Verk: | kr. 25.966.157,-. |
| P/f Articon: | kr. 16.644.779,-. |
| P/f J. & K. Petersen: | kr. 19.619.450,-. |

Ráðgevi kommununnar hevur eftirkannað tilboðini og mælir til at taka av tilboðnum frá P/f Articon.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>25. februar 2016 | Blað nr.: 67 |
| | Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum frá P/f Articon og heimila umsitingini at samráðast við P/f Articon um sáttmála um arbeiðið, at leggja fyri nevndina aftur saman við samlaðari kostnaðarmeting av arbeiðinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 62/16 Broyting av byggisamtykt í sambandi við nýggjan kirkjugarð í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 45/16 | 16/00592-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 62/16 | 16/00592-1 |

**Málslýsing:**
Fyrireikingarnar av nýggjum kirkjugarði í Hoyvík eru nú komnar so mikið langt, at projekteringin verður boðin út í næstum.

Økið, sum verður lagt til kirkjugarð, liggur norðan fyri Klingruna og er uml. 26.000 $m^2$ til støddar. (14/00772). Økið, sum talan er um, er partur av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn og liggur í eindini VI, Ítróttur og frítíðarvirksemi. Hendan eindin er skipað í tveir høvuðspartar:

- eind VI a har anlegg til ítrótt og frítíðarvirksemið kann byggjast
- eind VI b har golfvøllur skal verða. Á hesum partinum kann einki byggjast

Økið, ætlað til kirkjugarð, liggur í eind VI b og í almennu byggisamtyktini liggur økið í D2-ítróttarøki.

Býarskipanardeildin hevur eisini í samráð við teknisku deild gjørt uppskot til vegatgongd frá Klingruni til parkeringspláss við ætlaða kirkjugarðin. Vegurin gongur frá rundkoyringini við Løgmannabreyt.

Umsitingin mælir til, at uppskot til broyting av byggisamtyktum soleiðis, at økið ætlað til kirkjugarð verður tikið burturúr serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn og D2-ítróttarøkið í almennu byggisamtyktini verður broytt til D1-øki, sum er sami umráðispartur sum kirkjugarðurin við Velbastaðvegin og í Kollafirði eru staðsettir í. Umsitingin mælir eisini til, at serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn verður endurskoðað

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at økið ætlað til kirkjugarð verður tikið burturúr serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn og almenna byggisamtyktin verður broytt frá D2-øki til D1-øki samsvarandi hjáløgdu kortskjøl dagf. 26.01.2016.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 63/16 Uppskot til broyting av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 192/15 | 15/03675-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 187/15 | 15/03675-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.02.2016 | 54/16 | 15/03675-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 63/16 | 15/03675-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við viðgerð av byggimálinum fyri matr. nr. 1228g, Tórshavn, har, orsakað av hæddarmuninum á grundstykkinum, søkt var um at byggja hús í 3 hæddum við sløttum taki, samtykti byggi- og býarskipanarnevndin á fundi 8. mai 2015, at umsitingin skal taka stig til at broyta byggisamtyktina fyri økið, soleiðis at tað ber til at byggja hús í trimum hæddum her. (j.nr. 14/05212)

Vanliga skulu tær serstøku byggisamtyktirnar loyva meira bygging enn almenna byggisamtyktin loyvir fyri umráðispartin, sum serstaka byggisamtyktin liggur í. Hendan serstaka byggisamtyktin liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini, sum ikki loyvir bygging av sethúsum í 3 hæddum.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 28. august 2015, eitt mál (j.nr. 15/02287) um broyting av almennu byggisamtyktini. Broytingin snýr seg m.a. um, at ásetingarnar fyri A1 økir verða broyttar soleiðis, at víkjast kann frá ásetingunum um tal av hæddum í serstakari byggisamtykt, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur nátúrliga inn.

Í útstykkingini við Hjaltarók liggja fýra av teimum ovastu grundstykkini í serliga brøttum lendið. Tað snýr seg um matr. nr. 1228d, 1228e, 1228f og 1228g. Hesi grundstykkini kundu komið undir ásetingina at lendið er soleiðis hátta at tað fellur natúrliga inn, at húsini á hesum grundstykkjum kunnu verða í trimum hæddum.

Í sambandi við uppskotið um hesa broytingina av serstøku byggisamtyktini verður eisini mælt til at broyta aðrar ásetingar í §4, soleiðis at tær samsvara almennu byggisamtyktini.

Verandi §4 í serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn

**§4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA**

Stk. 1. Byggistig og nettonýtslustig má í mesta lagi verða 0,3

Stk. 2. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt stakhús, sum eisini kann hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Stk. 3. Bilhús/bilskúr/úthús verða bert roknaði uppí nettonýtslustigið við tí samlaðu víddini, ið fer uppum 35 $m^2$.

Broytt §4 í serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn

**§4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA**

Stk. 1. Byggistig og nettonýtslustig sambært ásetingum fyri A1-økir í almennu byggisamtyktini.

Stk. 2. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt stakhús, sum eisini kann hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Stk. 3. Grundstykkini matr. nr. 1228d, 1228e, 1228f og 1228g kunnu byggja í 3 hæddum.

Stk. 4. Hægsta punkt við útvegg skal ikki verða hægri enn 9,0 m frá planering.

Stk. 5. Bilhús/bilskúr/úthús/yvirdekkað øki verða bert roknaði uppí nettonýtslustigið við tí samlaðu víddini, ið fer upp um 10% av grundøkinum, tó í mesta lagi 50 $m^2$.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at §4 í serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn, verður broytt frá:

**<u>§4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA</u>**

Stk. 1. Byggistig og nettonýtslustig má í mesta lagi verða 0,3.

Stk. 2. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt stakhús, sum eisini kann hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Stk. 3. Bilhús/bilskúr/úthús verða bert roknaði uppí nettonýtslustigið við tí samlaðu víddini, ið fer upp um 35 $m^2$.

**til**

**<u>§4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA</u>**

Stk. 1. Byggistig og nettonýtslustig sambært ásetingum fyri A1-økir í almennu byggisamtyktini.

Stk. 2. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt stakhús, sum eisini kann hava eina minni íbúð, sum tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Stk. 3. Grundstykkini matr. nr. 1228d, 1228e, 1228f og 1228g kunnu byggja í 3 fullum hæddum.

Stk. 4. Hægsta punkt við útvegg skal ikki verða hægri enn 9,0 m frá planering.

Stk. 5. Bilhús/bilskúr/úthús/yvirdekkað øki verða bert roknaði uppí nettonýtslustigið við tí samlaðu víddini, ið fer upp um 10% av grundøkinum, tó í mesta lagi 50 $m^2$.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at gera viðmerkingar til ætlaðu broytingina av serstøku byggisamtyktina fyri útstykking við Hjaltarók, var 4. januar. Tá freistin var farin, var eitt mótmæli móttikið.

Mótmæli var frá Randi Kúrberg. Hon býr á Hjaltarók 5, sum er beint yvirav stykkjunum, sum ætlanin er at broyta ásetingarnar fyri. Hon vísir á, at:

1. Grundstykkini matr. nr. 1228d og 1228e ikki eru í so brøttum lendi og 1228 f og 1228g ikki er so nógv øðrvísi enn matr. nr. 1228r, sum longu er bygt við sethúsum í tveimum hæddum. Tí eru grundgevingarnar ikki sakligar og heilt beinar.

2. Stór/høg hús hava lyndi at gerast vinnubygningar.

3. Hægri hús oman fyri vegin myrkaleggja hennara bústað og taka dagsljós og árstíð frá henni. Ljós hevur týdning fyri trivnaðin.

4. Slíkar broytingar skapa fordømi fyri øðrum. Hon vil ikki missa ljós og útsýni omaneftir.

Ad. 1. Øll hesi grundstykkini hava ein jarðarmun uppá uml. 10 m og meira. Hetta kann metast av vera bratt.

Ad. 2. Sambært verandi byggisamtykt er loyvt at byggja 2 fullar hæddir og loft upp til 9 m hædd. Ætlaða broytingin í byggisamtyktini snýr seg um, at loyva 3 fullum hæddum upp til 9 m hædd. Ætlanin er ikki at broyta byggi- og nýtslustigið. Tvs. at eini hús við 2 hæddum og lofti, sum útnyttar nýtslustigið fult út, er størri í grundflatu enn eini hús við trimum fullum hæddum. Tí loyvir ætlaða broytingin ikki, at húsini verða hægri ella størri enn loyvt er við verandi byggisamtykt.

Ad. 3. Avstandurin millum húsini á Hjaltarók 5 og komandi hús á Hjaltarók 4 er í minsta lagi 25 m, og frástøðan til hini grundstykkini, sum ætlaða broytingin fevnir um, Hjaltarók 2, 6 og 8, er uppaftur longri. Umsitingin hevur gjørt eina skuggaanalysu av hvussu langan skugga eini 9 m høg hús við tveimum hæddum og lofti og eini 9 m høg hús við trimum fullum hæddum kasta 1. mai, 1. juni og 1. juli kl. 18.00. Myndirnar vísa, at húsið við 3 fullum hæddum og 9 m høgt, hevur ein longri skugga enn húsini við tveimum hæddum og høgari reising upptil 9 m, men munurin er ikki so stórur. Sæð í ljósinum av, at frástøðan millum húsini er í minsta lagið er 25 m, metir umsitingin ikki at ætlaða broytingin av byggisamtyktini tekur munandi dagsljós frá kæraranum.

Ad. 3. Áðrenn ein slík broyting verður gjørd í eini byggisamtykt, verður altíð mett um hvussu hetta kann ávirka umhvørvið rundanum. Tí vildi uppskotið til hesa broytingina, fyri tey ovastu grundstykkini í útstykkingini, um hon verður góðkend, ikki skapa fordømi fyri einari broyting framman fyri onnur hús í útstykkingini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at halda fast við ætlaðu broytingina vísandi til omanfyri standandi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 64/16 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri útstykingina oman Gil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 48/16 | 15/04685-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 64/16 | 15/04685-1 |

**Málslýsing:**
Serstaka byggisamtyktin fyri útstykkingina oman Gil varð góðkend av Fiskimálaráðnum 23. september 2014. Nú jørðarbeiðið við útstykkingini er gott í gongd og tey, sum hava fingið tillutað grundstykki, eru byrjaði at fáa teknað hús, hava vit fingið ymiskar spurningar um treytir fyri bygging.

Býararkitekturin og býarskipanardeildin ynskja at loyva øðrvísi og nútímans bygging í økinum, tó uttan at húsini fylla meira enn loyvt er í byggisamtyktini.

Serstaka byggisamtyktin hevur somu ásetingar um bygging sum almenna byggisamtyktin hevur fyri A3-øki. Her er t.d. mest loyvda hædd á húsum við einvegis takhalli í mesta lagi vera 6 m til hægsta punkt við útvegg á lægru síðuni og 7,5 m á hægru síðuni og hús við vanligari mønureising 9 m til mønu og 6 m til hægsta punkt við útvegg.

Eini hús við vanligari mønureising kunnu hava kvistar á báðum síðum, sum kunnu verða upp til helvtina av longdini av húsunum.

Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot um, at broyta byggisamtyktina soleiðis, at tað ber til at byggja eini hús í trimum hæddum, har ovasta hæddin er minni enn niðaru hæddirnar og ikki er størri enn ein mønureising við kvistum á báðum síðum, sum tó ikki eru meira enn helvtin av longdini á húsunum.

Planeringskotir og mest loyvda hædd á bygging á teimum ymisku byggifeltunum er víst í fylgiskjølum til serstøku byggisamtyktina. Ynski er komið fram um, at loyva byggjufeltunum 15, 16 og 17 at hækka planeringina 1 m í mun til ásetingarnar í fylgiskjølunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at Serstaka byggisamtyktin fyri útstykkingina oman Gil verður broytt soleiðis, at tað ber til at byggja eini hús í trimum hæddum, har triðja hæddin liggur innanfyri støddina av eini mønureising við kvistum á báðum síðum, sum tó ikki eru meira enn helvtin av longdini á húsunum, sambært hjáløgdu skjølum. Eisini verður mælt til, at byggifelt 15, 16 og 17 fáa loyvi til at hækka planeringina 1 m í mun til ásetingar í fylgiskjølum til serstøku byggisamtyktina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 65/16 Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri partav vestara havnaøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 46/16 | 16/00653-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 65/16 | 16/00653-1 |

**Málslýsing:**
Umvælingin av gamla saltsølubygninginum er nú um at verða liðug. Sambært almennu byggisatyktini liggur bygningurin í B2 umráðispartinum, sum er lagdur til vinnuendamál, ið hava samband við skipaferðslu og fiskiskap og til virksemi, ið hava samband við hesi.

Ætlanirnar við bygninginum hava verið, at leiga skrivstovur út til fyritøkur, sum hava við sjóvinnu at gera. Nú er tó staðfest, at tað verður trupult at fá leigarar til allar 7.200 fermetrarnar út til tílíkt virksemið. Tí hevur kommunan gjørt eitt uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið kring Sjóvinnuhúsið, frá B2-havnaøki til C3-øki, soleiðis at bygningurin eisini kann húsa øðrum virksemið.

**§ 21. Ásetingar fyri umráðispartin C3 í 3. grundumráði**

1. Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

2. Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið byggivaldið hevur góðkent fyri alt økið ella ein natúrliga avmarkaðan part av tí.

3. Byggistigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,4.

4. Nýtslustigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,8.

Samlaða víddin á bygninginum er uml. 7.550 m$^2$. Sambært ásetingunum fyri C3-økið má nýtslustigið fyri umráðispartin ikki fara uppum 0,8, tvs. at víddin á C3-økinum skal vera í minsta lagi 7.550/0,8 = 9.438 m$^2$.

Skotið verður upp, at eitt øki uppá uml. 9.570 m$^2$ verður broytt frá B2-havnaøki til C3-øki sambært hjálægda kortskjali dagfest 27.01.2016. Samstundis er ætlanin at laga B2-øki til verandi umstøðurnar á vestara havnaøki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarakitekturin mæla til, at almenna byggisamtyktin verður broytt frá B2-havnaøki til C3-øki og at B2-økið á vestara havnaøki verður lagað til verandi ustøður sambært kortskjali dagfest 27.01.2016.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Atkvøtt varð um tilmæli frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Ímóti atkvøddi:
Marin Katrina Frýdal

## 66/16 Gamlarætt. Leinging av flótibrúgv til ferðavinnubátar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 01.02.2016 | 2/16 | 16/00207-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 70/16 | 16/00207-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 66/16 | 16/00207-1 |

**Málslýsing:**
Í 2008 legði Tórshavnar kommuna eina flótibrúgv á Gomlurætt, sum var ætlað til ferðavinnubátar, sum gjørdu túrar vestanfyri. Eisini skuldi brúgvin brúkast til bátar úr Hesti og Koltri, sum sigldu um fjørðin.
Tá brúgvin bleiv løgd út, var tað mest Norðlýsið, sum sigldi við ferðafólki.

Síðani er nógv hent, og í dag eru tað 3 feløg, umframt "Norðlýsið", sum javnan brúka flótibrúnna í sambandi við túrar, mest til Hest og Koltur. Hetta viðførir at Kolturs- og Hestbátar, hava trupult at fáa pláss við brúnna.

Í 2015, hava bátarnir, sum sigla við ferðafólki av Gomlurætt, verið hesir:
Rib 62: 2 bátar.
Jab Adventure: 2 bátar
Nax Adventure: 1 bátur

Umframt hesar, hava Silja, Jósup og aðrir ferðafólkabátar brúkt brúnna á Gomlurætt av og á.

Í heyst eru bátar lagstir afturat, og fyri 2016 sær tali av bátum soleiðis út.
Rib 62: 2 bátar
Jab Adventure: 4 bátar
Nax Adventure: 2 bátar

Trýstið á plássini við brúnna var stórt í 2015.

Við enn fleiri bátum, kann væntast at trýstið verður enn størri í 2016.

Tórshavnar havn hevur kannað, hvat tað kostar at leingja ferðavinnubrúnna við 15 metrum afturat.

Um brúgvin blívur longd, fær hvørt av teimum trimum feløgunum eitt pláss í part, pláss verður til Norðlýsið ella annan líknandi bát, og pláss verður til tveir bátar úr Koltri og Hesti.

Kostnaðarmeting fyri 15 metrar av flótibrúgv við útlegging er mett til 250.000kr.

Tórshavnar havn hevur verið í samband við Landsverk, sum siga seg vilja viðgera eina umsókn um loyvi at leingja verðandi flótibrúgv, til vælvild.

Um peningur verður játtaður, og loyvi fæst frá landsverk at leingja brúnna, verður nýggja brúgvin klár til summarið 2016.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í bátapláss.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka støðu til, um íløgan skal gerast. Um íløgan skal gerast, og loyvi fæst frá LV, verður mælt til at játta kr. 250.000,- til arbeiðið.

**Vinnunevndin 01. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og játta kr. 250.000, ið verða fluttar av konto 5175, renovatión, á konto 7476, smábátahavnir. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini, fyri síðani at játta útleggið aftur í ár.

# 67/16 Bátahylur við Sjógv. Umlegging frá teymum til bátabrúgvar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 01.02.2016 | 3/16 | 16/00212-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 08.02.2016 | 6/16 | 16/00212-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 71/16 | 16/00212-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 67/16 | 16/00212-1 |

**Málslýsing:**
Í bátahylinum við Sjógv eru í dag 54 teymar, ongin er á bíðilista og onki pláss er tókt.

Tað hevur leingi verið eitt ynski frá bátaeigarunum, at fáa umlagt bátaplássini frá teymum til flótibrúgvar, sum er ein munandi høgligari og tryggari loysn.

Í miðjuni í bátahylinum er ein timburbrúgv, sum er í vánaligum standi.

Um timburbrúgvin, sum er í hylinum, verður tikin burtur, er pláss fyri tveimum flótibrúgvum, har tað kunnu liggja 64 bátar, tað eru 10 fleiri enn nú.

Um brúgvarnar verða á umleið sama støði, sum nýggju brúgvarnar á Argjum ið eru útgjørdar við el steyrum, ljósi og vatni, er samlaði kostnaðurin kr. 3.190.000,-.

Tórshavnar havn hevur áður staðið fyri innkeypi og útlegging av bátabrúgvum, við hjálp frá undirveitarum.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í bátapláss.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka støðu til, um íløgan skal gerast. Um íløgan skal gerast, verður mælt til at játta kr. 3.190.000,- til arbeiðið.

**Vinnunevndin 01. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Kollafjarðarnevndin 08. februar 2016:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 3.190.000 av konto 7476, smábátahavnir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

# 68/16 Broyting av bátaøkinum á Skálatrøð frá teymum til bátabummar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 01.02.2016 | 4/16 | 16/00285-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 72/16 | 16/00285-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 68/16 | 16/00285-1 |

**Málslýsing:**
Tað er eitt ynski hjá teimum, sum hava bátateym, at báturin kann fáa pláss við ein bátabumm ístaðin.
Tað er nógv høgligari at hava pláss við eina flótibrúgv, og ikki heilt vandaleyst at sleppa umborð á ein bát, sum liggur við teym.

Tað eru 27 bátapláss í Skálatrøð sum hava teym.

Um tað blíva keyptir 75 metrar av nýggjum flótbrúgvum við tilhoyrandi bátabummum, fáa vit pláss fyri teimum 27 bátunum, sum nú liggja við teym, umframt 18 bátapláss afturat.
Um brúgvarnar verða á umleið sama støði, sum nýggju brúgvarnar á Argjum, ið eru útgjørdar við el steyrum, ljósi og vatni, er samlaði kostnaðurin kr. 2.235.000.

Tórshavnar havn hevur áður staðið fyri innkeypi og útlegging av bátabrúgvum, við hjálp frá undirveitarum.

Brúgvarnar koma at hava umleið somu frástøðu frá virkseminum hjá MEST, sum verðandi brúgvar.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í bátapláss.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka støðu til, um iløgan skal gerast. Um íløgan skal gerast, verður mælt til at játta kr. 2.235.000,- til arbeiðið.

**Vinnunevndin 01. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at játta kr. 2.235.000, ið verða fluttar av konto 5175, renovatión, á konto 7476, smábátahavnir. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini, fyri síðani at játta útleggið aftur í ár.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 21:30</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Olsen |
| | Sigrun Mohr | |